Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 12

ISSN 0907-905X

Nr. 45 11. mai 2009

**Løgtingslóg**
**um**
**góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (grannskoðaralógin)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## Kapittul 1
## Øki lógarinnar

**§ 1.** Henda lóg fevnir um treytirnar fyri góðkenning og skráseting av grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, um treytirnar fyri fremjan av uppgávum í sambandi við grannskoðan v.m. og reglur um alment eftirlit við góðkendum grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum.
*Stk. 2.* Lógin er galdandi, tá grannskoðarin gevur grannskoðanarátekningar á roknskapir, heruppií tá grannskoðarin ummælir leiðslufrágreiðingar sambært ársroknskaparlógini, og tá grannskoðarin gevur aðrar váttanir við trygd, ið ikki einans eru ætlaðar til egna nýtslu hjá tí, sum hevur biðið um tær.
*Stk. 3.* Lógarinnar § 15, stk. 3, § 20, § 28, §§ 41-44 og § 51, stk. 4, 1. pkt. eru eisini galdandi, tá grannskoðari gevur aðrar váttanir, ið eru kravdar sambært lóggávuni annars, ella ikki einans eru ætlaðar til egna nýtslu hjá tí, sum hevur biðið um tær.
*Stk. 4.* Við „grannskoðari" er í hesi lóg at skilja persónur, ið er góðkendur sambært §§ 3, 10 og 11, um ikki annað sæst týðiliga.
*Stk. 5.* Við „grannskoðanarvirki" er í hesi lóg at skilja eitt virki, ið er góðkent sambært § 13, um ikki annað sæst týðiliga.

## Kapittul 2
## Góðkenning v.m.

*Almenn skrá*

**§ 2.** Skráseting Føroya førir eina almenna skrá yvir góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir. Í skránni standa
1) persónar, ið eru góðkendir sum løggildir ella skrásettir grannskoðarar, sbr. § 3,
2) persónar, ið sambært § 10, stk. 1,eru góðkendir sum grannskoðarar,
3) persónar, ið sambært § 10, stk. 3, hava fingið loyvi til at røkja ítøkilig størv,
4) persónar, ið fyribils og av og á geva váttanir, sbr. § 11, stk. 2,
5) virkir, ið eru góðkend sum grannskoðanarvirkir, sbr. § 13.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um, hvussu skráin verður førd, heruppií um fráboðan til skránna og um røkt av henni.

*Góðkenning sum løggildur grannskoðari og skrásettur grannskoðari*

**§ 3.** Skráseting Føroya kann góðkenna ein persón sum løggildan grannskoðara ella skrásettan grannskoðara, um viðkomandi
1) hevur bústað í Føroyum, ella er fevndur av reglunum í Hoyvíkssáttmálanum um niðurseturætt og tænastuveitingar,
2) er myndugur og ikki undir verju,
3) ikki hevur boðað frá gjaldsteðgi ella er undir trotabúaviðgerð
4) hevur staðið eina serliga próvtøku, sbrt. reglum givnar sambært § 31,
5) í minsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár serliga hevur tikið lut í uppgávum, ið viðvíkja grannskoðan av ársroknskapum, samtøkuroknskapum ella samsvarandi roknskaparfrágreiðingum, og
6) er tryggjaður móti fíggjarligum krøvum, sum kunnu standast av at fremja uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3.

*Stk. 2.* Um ein sínamillum avtala er gjørd millum Føroyar og ES, EBS ella beinleiðis við einstøk lond um niðurseturætt og tænastuveitingar, hava persónar, fevndir av avtaluni, sama rætt til góðkenning sum persónar, fevndir av stk. 1, nr. 1.
*Stk. 3.* Uppgávur sambært stk. 1, nr. 5 skulu gerast í einum grannskoðanarvirki. Góðkenning sum løggild-

ur grannskoðari kann einans verða fingin, um uppgávurnar eru undir eftirliti av løggildum grannskoðara.
*Stk. 4.* Skráseting Føroya kann geva undantak frá treytini í stk. 1, nr. 5.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um tryggingina sambært stk. 1, nr. 6, heruppií um vavið og slagið av trygging og um tíðarskeiðið, tryggingin fevnir um.
Stk. 6. Góðkenning kann verða noktað
1) undir teimum í § 78, stk. 2 í revsilógini nevndu umstøðum,
2) um viðkomandi hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja uppgávuna sum álitisumboð hjá almenninginum á fullgóðan hátt, ella
3) um viðkomandi hevur eina falna skuld til tað almenna upp á 50.000 kr. og meira.

*Eftirútbúgving*

**§ 4.** Grannskoðari, ið er góðkendur sambært § 3, hevur skyldu til at luttaka í eini hóskandi eftirútbúgvingarætlan, ið tryggjar, at viðkomandi javnt og samt heldur við líka sín ástøðiliga kunnleika, sín yrkisførleika og sín kunnleika um krøvini til álitisumboðið hjá almenninginum á einum nóg høgum støði.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um eftirútbúgving og eftirlit við hesi.
*Stk. 3.* Grannskoðari skal til eina og hvørja tíð kunna skjalprógva, at krøvini um eftirútbúgving eru lokin.

*Nýtsla av heiti*

**§ 5.** Einans persónur, sum er góðkendur sum løggildur grannskoðari, kann nýta heitið „løggildur grannskoðari“ ella samansetingar við hesum.
*Stk. 2.* Einans persónur, sum er góðkendur sum skrásettur grannskoðari, kann nýta heitið „skrásettur grannskoðari“ ella samansetingar við hesum.
*Stk. 3.* Einans persónur, ið er góðkendur sum grannskoðari sambært § 3 og § 10, stk. 1, kann nýta heitið „góðkendur grannskoðari“ ella samansetingar við hesum.
*Stk. 4.* Tað er ikki loyvt at nýta føroysk ella útlendsk heiti, ið kunnu mistakast fyri hesi. Hetta er tó ikki galdandi fyri teir persónar, ið er góðkendir sambært §§ 10 og 11.
*Stk. 5.* Persónur, ið ikki longur er góðkendur sum løggildur ella skrásettur grannskoðari, kann ikki nýta heitið „løggildur grannskoðari“ ella „skrásettur grannskoðari“ ella samansetingar ella styttingar av hesum, sbr. tó § 6, stk.1.

*Varðveitsla*

**§ 6.** Grannskoðari kann lata sína góðkenning í varðveitslu hjá Skráseting Føroya. Varðveitsla er treytað av, at góðkenningin ikki er fallin burtur sambært § 7, tikin frá viðkomandi sambært § 8 ella frádømd sambært § 42, stk. 2, ella § 79 í revsilógini.
*Stk. 2.* Grannskoðari, sum hevur latið sína góðkenning í varðveitslu hjá Skráseting Føroya, kann í handilsviðurskiftum ikki nýta heitið „løggildur grannskoðari“, „skrásettur grannskoðari“ ella „góðkendur grannskoðari“. Samansetingar ella styttingar av hesum heitum kunnu ikki verða nýttar.
*Stk. 3.* Persónur, ið hevur latið sína góðkenning í varðveitslu, kann eftir áheitan um hetta aftur verða góðkendur treytað av, at viðkomandi lýkur treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 og 6 og § 4, og at viðkomandi ikki hevur falna skuld til tað almenna upp á 100.000 kr. ella meira. § 8, stk. 3 og § 9, stk. 3, verða nýttar í sambandi við góðkenning aftan á varðveitslu.
*Stk. 4.* Grannskoðari, ið leggur sína góðkenning í varðveitslu, verður strikaður úr almennu skránni yvir góðkendar grannskoðarar.

*Burturfall*

**§ 7.** Góðkenning sum grannskoðari fellur burtur, um treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 ella 6 ikki longur eru loknar.
*Stk. 2.* Eftir áheitan frá Skráseting Føroya skal grannskoðari prógva, at hann er tryggjaður sambært § 3, stk. 1, nr. 6. Skráseting Føroya skal hava fingið skjalprógv um hetta í seinasta lagi 4 vikur eftir áheitanina. Er skjalprógv ikki fingið, innan freistin er úti, fellur góðkenningin burtur.
Frátøka

**§ 8.** Skráseting Føroya kann taka góðkenning frá grannskoðara, um grannskoðarin hevur falna skuld til tað almenna upp á 100.000 kr. og meira. Góðkenningin kann verða frátikin, til viðurskiftini eru komin í rættlag. Í avgerðini skal upplýsast, at avgerðin kann verða løgd fyri rættin eftir § 49 og um freistina fyri hesum.
*Stk. 2.* Harumframt kann Skráseting Føroya taka góðkenningina frá einum grannskoðara, um
1) grannskoðarin noktar at geva seg undir reglurnar um góðskueftirlit, sbr. § 27, ella
2) grannskoðarin ikki lýkur krøvini í § 4 um eftirútbúgving, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Um grannskoðara bert vantar at fullføra ein lítlan part av eftirútbúgvingini, kann Skráseting Føroya áseta eina freist fyri, nær grannskoðarin skal lúka krøvini um eftirútbúgving, ið eru ásett sambært § 4, stk. 2.

*Avleiðing av burturfalli v.m.*

**§ 9.** Er ein góðkenning sum grannskoðari fallin burtur sambært § 7, frátikin sambært § 8, ella frádømd sambært § 42, stk. 2 ella § 79 í revsilógini, verður persónurin strikaður úr almennu skránni yvir góðkendar grannskoðarar, og eftir hetta kann viðkomandi ikki longur nýta góðkenningarprógvið ella tað fakliga heitið.
*Stk. 2.* Er orsøkin til burturfallið ella frátøkuna burtur, ella endar ella verður frádømingin av eini góðkenning sett úr gildi, skal góðkenningin eftir áheitan setast í gildi av nýggjum, og persónurin skal skrásetast í al-

mennu skránni yvir góðkendar grannskoðarar. Tað er ein fortreyt, at treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1-3 og 6 og § 4 eru loknar, og at viðkomandi ikki hevur eina falna skuld til tað almenna upp á 100.000 kr. ella meira.
*Stk. 3.* Hevur persónur í mong ár verið uttan góðkenning, kann í staðin fyri kravið um eftirútbúgving sambært § 4 koma ein serlig roynd sambært reglum, sum Skráseting Føroya setir.

*Onnur góðkenning sum grannskoðari v.m.*

**§ 10.** Skráseting Føroya kann góðkenna persón sum grannskoðara, sum prógvar, at hava tikið útbúgving uttanlands, ið verður mett at kunna javnmetast við útbúgving eftir § 3, og sum annars lýkur treytirnar í § 3. Persónurin skal eisini prógva sín kunnleika til føroyska lóggávu.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í §§ 4-9 verða at nýta samsvarandi fyri grannskoðarar, ið eru góðkendir eftir stk. 1.
*Stk. 3.* Skráseting Føroya kann annars, tá serligar umstøður gera seg galdandi, loyva útlendskum grannskoðarum at røkja ítøkilig størv, har lóggávan krevur ein løggildan ella skrásettan grannskoðara. Slíkt loyvi kann vera avmarkað og treytað.

*Høvi til at geva váttanir fyribils og av og á*

**§ 11.** Grannskoðarar, ið eru góðkendir og hava bústað í einum landi, sum Føroyar hava gjørt sínámillum avtalu við, kunnu fyribils og av og á geva váttanir sambært § 1, stk. 2 og 3. Váttanin má tó ikki viðvíkja lógbodnari grannskoðan av ársroknskapum og samtøkuroknskapum. Grannskoðarar, ið geva váttan sambært 1. pkt., skulu nýta sítt fakliga heiti í bústaðarlandinum.
*Stk. 2.* Grannskoðarar, ið stk. 1 fevnir um, skulu geva Skráseting Føroya fráboðan, áðrenn váttanir verða givnar. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um fráboðan og skráseting.
*Stk. 3.* Skráseting Føroya førir eina almenna skrá yvir grannskoðarar, sbr. stk.1, sum, tá fráboðan verður latin inn, hava bústað í einum landi, sum Føroyar hava gjørt sínamillum avtalu við, og sum hava boðað Skráseting Føroya frá, at teir fyribils og av og á ætla at geva váttanir í Føroyum. Skrásett verður navn, bústaður og fakliga heitið hjá viðkomandi.

**§ 12.** Grannskoðarar, ið sambært § 11, stk. 1, geva váttanir í Føroyum, skulu geva teimum, sum eru móttakarar av váttanunum, upplýsingar um síni fakligu heiti í bústaðarlandinum, møguligt skrásetingarnummar í eini almennari skrá í bústaðarlandinum, møguligt mvg-skrásetingarnummar í bústaðarlandinum og um møguliga trygging til rindan av vinnuábyrgd.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um tær upplýsingar, sum skulu latast sambært stk. 1.

*Góðkenning sum grannskoðanarvirki v.m.*

**§ 13.** Skráseting Føroya góðkennir eitt og hvørt virki sum grannskoðanarvirki, sbr. tó stk. 7 og 8, ið:

1) lýkur treytirnar í stk. 2 og 5 og treytir í reglum givnar sambært stk. 6, og
2) gevur seg undir reglurnar um góðskueftirlit sambært § 29.

*Stk. 2.* Í grannskoðanarvirkjum skal meirilutin av atkvøðurættunum vera ogn hjá góðkendum grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum. Um ein sínámillum avtala er gjørd millum Føroyar og ES, EBS ella beinleiðis við einstøk lond um niðurseturætt og tænastuveitingar, hava góðkendir grannskoðarar og góðkend grannskoðanarvirkir, ið eru fevnd av avtaluni, sama rætt sum góðkendir grannskoðarar og grannskoðanarvirkir sambært pkt. 1. Av atkvøðurættunum, ið eftir eru, kunnu onnur í mesta lagi ráða yvir 10% í part. Henda avmarking er tó ikki galdandi fyri

1) persónar, ið hava sítt høvuðsstarv í grannskoðanarvirkinum,
2) starvsfólkafeløg í einum grannskoðanarpartafelag, grannskoðanarsmápartafelag ella grannskoðanarsamløgupartafelag (grannskoðanarpartnarafelag), ið eru óheft av leiðsluni í grannskoðanarfelagnum og einans hava teir í nr. 1 nevndu persónar sum limir, og
3) persónar, ið hava ognað sær atkvøðurætt í einum grannskoðanarpartafelag, grannskoðanarsmápartafelag ella grannskoðanarsamløgupartafelag (grannskoðanarpartnarafelag) sum liður í eini starvsfólkaskipan.

*Stk. 3.* Einans grannskoðanarvirki, ið er góðkent sambært stk. 1, kann nýta heitið „góðkent grannskoðanarvirki“ ella samansetingar við hesum.
*Stk. 4.* Grannskoðanarvirkir, har meirilutin av atkvøðurættunum er ogn hjá løggildum grannskoðarum ella løggildum grannskoðanarvirkjum, ávikavist skrásettum grannskoðarum ella skrásettum grannskoðanarvirkjum, hava einarætt at nýta heitið „løggilt grannskoðanarvirki“ ávikavist „skrásett grannskoðanarvirki“ ella samansetingar við hesum. Tað er ikki loyvt at nýta føroysk ella útlendsk heiti, ið kunnu mistakast fyri hesi.
*Stk. 5.* Meirilutin av limunum í ovastu leiðsluni í grannskoðanarvirkinum skal vera góðkendir grannskoðarar ella grannskoðanarvirkir. Um ein sínamillum avtala er gjørd millum Føroyar og ES, EBS ella beinleiðis við einstøk lond um niðurseturætt og tænastuveitingar, hava grannskoðarar ella grannskoðanarvirki, ið eru fevnd av avtaluni, og eru góðkend sambært reglum, ið fremja fyriskipan hjá ES-tinginum og Ráðnum um lógbodna grannskoðan av ársroknskapum og konsolideraðum roknskapum sama rætt sum góðkendir grannskoðarar og grannskoðanarvirki sambært 1. pkt.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um útinningina av grannskoðanarvirksemi í ymiskum virkisformum, heruppií reglur um navn virkisins, húsagang og neyðskuldarsemju v.m., um útinnan av atkvøðurættinum í grannskoðanarvirkinum og avhendan av atkvøðurætti í sambandi við deyða, ella um góðkenningin verður latin í varðveitslu.

*Stk. 7.* Góðkenning kann verða noktað, um orsøk er at halda, at virkið ikki fer at kunna røkja uppgávuna á fullgóðan hátt.
*Stk. 8.* Eitt virki, hvørs góðkenning sum grannskoðanarvirki er fallin burtur sbr. § 14, stk. 1, frátikin sambært § 14, stk. 2, ella frádømd, sbr. § 42, stk. 4, 3. pkt., kann einans verða góðkent av nýggjum, um orsøkin til, at góðkenningin er fallin burtur ella frátikin, ikki longur er til staðar, ella ein frádøming er endað ella sett úr gildi.

**§ 14.** Góðkenning sum grannskoðanarvirki fellur burtur, um grannskoðanarvirkið ikki longur lýkur treytirnar í § 13, stk. 2 og 5 og treytirnar í reglum, givnum sambært § 13, stk. 6.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya kann taka góðkenningina frá einum grannskoðanarvirki, um hetta noktar at geva seg undir reglurnar um góðskueftirlit sambært § 27.
*Stk. 3.* Er ein góðkenning sum grannskoðanarvirki fallin burtur sambært stk.1, frátikin sambært stk. 2, ella frádømd sambært § 42, stk. 4, 3. pkt., verður virkið strikað úr almennu skránni yvir góðkend grannskoðanarvirkir, og kann eftir hetta ikki longur nýta heitið »góðkent grannskoðanarvirki«, sbr. § 13, stk. 3, ella »løggilt grannskoðanarvirki« ella »skrásett grannskoðanarvirki«, sbr. § 13, stk. 4, ella samansetingar ella styttingar av hesum.

## Kapittul 3
## Virksemi grannskoðarans v.m.

*Virksemi grannskoðarans*

**§ 15.** Grannskoðarin er álitisumboð hjá almenninginum, tá hann ger uppgávur sambært § 1, stk. 2. Grannskoðari skal gera uppgávurnar í samsvari við góðan grannskoðanarsið, heruppií vísa tann neyvleika og skjótleika, sum einstaka uppgávan loyvir. Góður grannskoðanarsiður merkir eisini, at grannskoðarin skal vísa integritet, partloysi, trúnað, yrkisliga framferð, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, tá uppgávurnar verða framdar.
*Stk. 2.* Uppgávur sambært stk. 1, kunnu einans verða gjørdar í grannskoðanarvirkjum, sbr. tó § 10, stk. 3 og § 11.
*Stk. 3.* Grannskoðarin skal, tá hann fremur uppgávur sambært § 1, stk. 3, vísa yrkisførleika og neyðugt nærlagni. Um grannskoðarin ikki er óheftur, tá hann ger uppgávurnar, sbr. § 22, skal hetta verða upplýst í váttanini.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um etikk, gerð av grannskoðanaruppgávum og um grannskoðarans veitan av váttanum, heruppií ummælir hjá grannskoðarum av leiðslufrágreiðingum sambært ársroknskaparlógini, og tá grannskoðari veitir aðrar váttanir við trygd. Skráseting Føroya kann gera av, at grannskoðarar og grannskoðanarvirkir skulu nýta talgilda undirskrift ella eina samsvarandi elektroniska undirskrift í sambandi við fremjing av uppgávum, sum § 1, stk. 2, fevnir um.

*Tá grannskoðari fer úr starvi v.m.*

**§ 16.** Um grannskoðari gevur grannskoðanarátekning ella aðrar váttanir við trygd á ársroknskapir v.m. sambært § 1, stk. 2, heldur starv grannskoðarans fram til nýggjur grannskoðari hevur tikið við, um ikki annað fylgir av lóggávuni ella av viðtøkunum hjá einum virki, ella annað er avtalað.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1, kann grannskoðari til eina og hvørja tíð fara úr starvi, um hetta ikki stríðir ímóti góðum grannskoðanarsiði. Fer grannskoðari frá, skal grannskoðarin, sum tekur við, venda sær til fráfarandi grannskoðaran, ið hevur skyldu til at upplýsa orsøkirnar til, at hann fer frá. Fráfarandi grannskoðarin hevur eisini skyldu til at geva grannskoðaranum, sum tekur við, atgongd til allar týðandi upplýsingar um tað virkið, sum váttanin hjá grannskoðaranum viðvíkur.

*Grannskoðanarátekning ella onnur váttan við trygd*

**§ 17.** Tá grannskoðari er liðugur við eina grannskoðan, skal grannskoðarin geva eina grannskoðanarátekning á roknskapin um gjørda arbeiðið og niðurstøðuna av tí. Grannskoðanarátekningin skal verða givin av tí ella teimum grannskoðarunum, ið eru valdir at gera uppgávuna, ella, um eitt grannskoðanarvirki er valt, av tí ella teimum grannskoðarunum, sum hava staðið fyri og hava endaligu ábyrgdina av uppgávuni. Grannskoðanarátekningar á roknskapir mugu ikki verða givnar saman við øðrum enn góðkendum grannskoðarum, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 2.* Um tað í lóggávuni ella í viðtøkunum hjá einum virki er ásett, at fleiri grannskoðarar skulu veljast til at geva grannskoðanarátekningar ella aðrar váttanir við trygd á roknskapir, mugu hesir grannskoðarar ikki vera knýttir at sama grannskoðanarvirki.
*Stk. 3.* Hóast ásetingina í stk. 1, kann grannskoðari geva eina grannskoðanarátekning saman við landsgrannskoðaranum, um grannskoðanin er fevnd av løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. ella av serlóggávu, sambært hvørjari landsgrannskoðarin fremur grannskoðanina saman við einum løggildum ella skrásettum grannskoðara.
*Stk. 4.* Aðrar váttanir við trygd enn grannskoðanarátekningar, sbr. § 1, stk. 2, skulu undirskrivast av tí ella teimum grannskoðarunum, ið eru valdir at gera uppgávuna, ella, um eitt grannskoðanarvirki er valt, av tí ella teimum grannskoðarunum, ið hava staðið fyri og hava ta endaligu ábyrgdina av uppgávuni. Váttanin kann verða givin saman við øðrum enn grannskoðarum.

*Grannskoðanarprotokoll*

**§ 18.** Grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarprotokoll í virkjum, hvørs ársroknskapur v.m. verður grannskoðaður.
*Stk. 2.* Grannskoðanarprotokollin skal verða førd til nýtslu hjá tí, ið hevur biðið um grannskoðanina, um ikki annað er kravt. Í virkjum, sum hava ein grannskoðanarbólk, sbr. § 29, er grannskoðanarprotokollin eisini til nýtslu hjá grannskoðanarbólkinum.

*Stk. 3.* Í grannskoðanarprotokollini skal grannskoðarin greiða frá um slagið og vavið av gjørdu grannskoðanunum og niðurstøðurnar av teimum. Heruppií skal grannskoðarin, tá grannskoðað er, í minsta lagi geva upplýsing um:

1) Týdningarmiklar spurningar viðvíkjandi grannskoðanini, heruppií serliga stóra óvissu, skeivleikar ella brek viðvíkjandi bókhaldi virkisins, roknskaparførslu ella innaneftirliti,
2) viðurskifti, sum vanliga mugu ætlast at hava týdning fyri støðutakanina hjá móttakaranum, ella honum sum hevur biðið um grannskoðanina, til ársroknskapin v.m.
3) um grannskoðarin lýkur lógarinnar krav um óheftni grannskoðarans, og
4) um grannskoðari, meðan grannskoðað hevur verið, hevur fingið allar tær upplýsingar, sum biðið er um.

*Stk. 4.* Aðrar fráboðanir kunnu ikki koma í staðin fyri upplýsingarnar í grannskoðanarprotokollini.

*Stk. 5.* Í móðurfeløgum, ið gera samtøkuroknskap, skal grannskoðanarprotokollin hava eina umrøðu av grannskoðanini av samtøkuroknskapinum.

**§ 19.** Í grannskoðanarprotokollum, ið viðvíkja einum ársroknskapi v.m. hjá virkjum, sum nevnd í stk. 3, skal grannskoðarin eisini geva upplýsing um:

1) Aðrar veitingar enn grannskoðan, sum grannskoðanarvirkið og tess dótturfeløg hava veitt grannskoðaða virkinum, og
2) tey tiltøk, sum eru sett í verk fyri at minka um møguligar hóttanir móti óheftni grannskoðarans, sum skjalprógvað av grannskoðaranum, sbr. § 22, stk. 6.

*Stk. 2.* Í móðurfeløgum, ið gera samtøkuroknskap, skulu upplýsingar sambært stk. 1, nr. 1 eisini verða givnar um samtakið sum heild.

*Stk. 3.* Hesi virki eru fevnd av stk. 1, til tey ikki longur lúka treytirnar:

1) Virkir, ið hava virðisbrøv, ið verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES-landi ella einum EBS-landi,
2) almenn partafeløg,
3) kommunur ella kommunalir felagsskapir, sbr. § 51 í kommunustýrislógini,
4) virkir, ið eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum, tó ikki virkir, ið fáast við tryggingarmeklaravirksemi sambært § 42 í lógini um tryggingarvirksemi og reglum settar í gildi við heimild í hesi, og virkir, ið eru fevnd av kapittli 20 a (íløguráðgevar) í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed, og
5) virkir, sum í tveimum fylgjandi roknskaparárum fara upp um tvær ella fleiri av hesum treytum:
   a) eitt starvsfólkatal upp á 2.500 persónar,
   b) ein javna upp á 5 mia. kr., ella
   c) ein nettoumsetning upp á 5 mia. kr.

*Fráboðan um fíggjarlig brotsverk*

**§ 20.** Sær grannskoðarin, tá hann ger uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3, at ein ella fleiri limir í leiðsluni hjá virkinum fremja ella hava framt fíggjarlig brotsverk í sambandi við sítt starv, og hevur grannskoðarin grundaðan illgruna um, at brotsverkið viðvíkur stórum upphæddum ella annars er av grovum slagi, skal grannskoðarin beinanvegin geva hvørjum einstøkum limi í leiðsluni boð um hetta. Fráboðanin verður skrivað í grannskoðanarprotokollina, um grannskoðarin førir eina slíka. Hevur leiðslan í seinasta lagi 14 dagar eftir hetta ikki skjalprógvað fyri grannskoðaranum, at hon hevur tikið neyðug stig til at steðga brotsverkum, ið fara fram, og til at bøta um teir skaðar, sum framdu brotsverkini hava elvt til, skal grannskoðarin beinanvegin boða Føroya Landfúta frá um tey fíggjarligu brotsverkini, sum illgruni er um. 1. - 3. pkt. eru ikki galdandi fyri viðurskifti, ið eru fevnd av reglunum í fyriskipan om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme og av løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi.

*Stk. 2.* Metir grannskoðarin fráboðan til limirnar í leiðsluni ikki egnaða at forða framhaldandi brotsverkum, skal grannskoðarin beinanvegin geva Føroya Landfúta boð um tey fíggjarligu brotsverkini, sum illgruni er um. Sama er galdandi, um ein meiriluti av limunum í leiðsluni hevur tikið lut í ella hevur kunnleika um tey fíggjarligu brotsverkini.

*Stk. 3.* Fer grannskoðarin frá, sbr. § 16, stk. 2, og hendir hetta í sambandi við, at grannskoðarin hevur grundaðan illgruna um, at støðan er, sum nevnt í stk. 1, 1. pkt., skal grannskoðarin beinanvegin geva Føroya Landfúta boð um hetta og um orsøkirnar til, at hann fer frá.

*Skjalprógv*

**§ 21.** Grannskoðarar og grannskoðanarvirkir skulu fyri hvørja uppgávu sambært § 1, stk. 2 gera arbeiðsskjøl, ið skjalprógva grundarlagið fyri givnu váttanini ella ummælinum. Arbeiðsskjølini og avrit av givnum váttanum, grannskoðanarprotokollum og roknskapum skulu goymast í 5 ár frá undirskriving av váttanini, sum tilfarið viðvíkur.

*Stk. 2.* Tá móðurfeløg, ið gera samtøkuroknskap, verða grannskoðað, skulu arbeiðsskjølini eisini skjalprógva ta gjøgnumgongd, ið er gjørd av tí grannskoðanararbeiði, sum aðrir grannskoðarar hava gjørt við samtøkugrannskoðan fyri eyga.

*Stk. 3.* Um grannskoðanararbeiðið í dótturfeløgum er gjørt av einum ella fleiri grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum, ið ikki hava heimstað í Føroyum, eru fevnd av reglunum í Hoyvíkssáttmálanum um niðurseturætt og tænastuveitingar, sbr. § 3, stk. 1, nr. 1, ella eru fevnd av sínamillum avtalu við ES, EBS ella einstøk lond, sbr. § 3, stk. 2, skal grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið goyma eitt eintak av skjalpróvnum, heruppií arbeiðsskjøl, fyri tað grannskoðanararbeiði, sum er gjørt í dótturfelagnum, sum hevur

týdning fyri grannskoðanina av samtøkuroknskapinum. Grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið kann lata vera við at goyma skjalprógvið, um avtala er gjørd um, at tað eftir áheitan er nøktandi og óavmarkað atgongd til hetta, ella um onnur hóskandi tiltøk eru framd.

*Stk. 4.* Um grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið verður forðað í at taka ímóti skjalpróvnum sambært stk. 3, skulu arbeiðsskjølini skjalprógva hesar forðingar.

*Stk. 5.* Stk. 3 og 4 eru ikki galdandi, um avtala sambært § 45, stk. 5, nr. 2 er gjørd við viðkomandi land.

## Kapittul 4
## Óheftni grannskoðarans

**§ 22.** Ein grannskoðari, ið ger uppgávur, sum § 1, stk. 2, fevnir um, skal vera óheftur av tí virki, sum uppgávan viðvíkur, og má ikki vera uppií, tá avgerðir verða tiknar í virkinum.

*Stk. 2.* Ein grannskoðari er ikki óheftur, um tað eru beinleiðis ella óbeinleiðis fíggjarlig, handilslig- ella setanarlig viðurskifti ella onnur viðurskifti, heruppií latan av veitingum, ið § 1, stk. 2 ikki fevnir um, millum grannskoðaran og tað virkið, sum ein uppgáva viðvíkur, sum hjá einum vælkunnaðum triðjamanni, kunnu vekja iva um óheftni grannskoðarans. Sama er galdandi, um sambandið er millum aðrar persónar í grannskoðanarvirkinum, ið eru knýttir at uppgávuni ella hava eftirlit við fremjingini av henni, grannskoðanarvirkið ella netverkið hjá grannskoðanarvirkinum, og tað virkið, sum uppgávan viðvíkur.

*Stk. 3.* Verður óheftnið hjá grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum hótt, heruppií av sjálvgrannskoðan, egináhugamálum, óvild, tøttum persónligum sambondum, heruppií familjuligum, ella hóttan, skal grannskoðarin ella grannskoðanarvirkið fremja neyðug trygdartiltøk til tess at minka um slíkar hóttanir. Er hóttanin av slíkum slag, í mun til gjørdu trygdartiltøkini, at óheftnið hjá grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum er komið í vanda, skal grannskoðarin lata vera við at fremja uppgávur sambært § 1, stk. 2.

*Stk. 4.* Ein grannskoðari kann ikki fremja uppgávur eftir § 1, stk. 2, ið viðvíkja einum virki, sum er fevnt av § 19, stk. 3, um talan er um sjálvgrannskoðan ella egináhugamál. Tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina í einum slíkum virki, kunnu ikki taka á seg leiðandi størv í hesum virki, fyrr enn 2 ár eftir, at viðkomandi er farin frá sum grannskoðari.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um viðurskifti, sum eru fevnd av stk. 2 og 3, heruppií um hóttanir, trygdartiltøk og føri, tá grannskoðari ella grannskoðanarvirki ikki er óheft. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta reglur um sjálvgrannskoðan og egináhugamál, sbr. stk. 4.

*Stk. 6.* Grannskoðanarvirki skal gera leiðreglur, ið tryggja, at grannskoðari, áðrenn hann átekur sær uppgávur sambært § 1, stk. 2, tekur støðu til, um tað eru viðurskifti, sum hjá einum vælkunnaðum triðjamanni kunnu vekja iva um óheftnið hjá viðkomandi. Grannskoðanarvirkini skulu eisini tryggja, at grannskoðarar, í sambandi við at teir fremja uppgávur, í sínum arbeiðsskjølum skjalprógva allar stórar hóttanir móti óheftninum hjá grannskoðaranum ella grannskoðanarvirkinum og teimum trygdartiltøkum, ið eru sett í verk fyri at minka um hesar hóttanir.

**§ 23.** Eitt grannskoðanarvirki, ið grannskoðar virkir, sum eru fevnd av § 19, stk. 3, skal tryggja, at tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina, í seinasta lagi 7 ár eftir, at teir eru tilnevndir at gera uppgávuna, verða skiftir út fyri eitt tíðarskeið, sum er í minsta lagi 2 ár.

**§ 24.** Eitt grannskoðanarvirki kann ikki í 5 fylgjandi roknskaparárum hava ein størri part av sínum umsetningi enn 20 prosent hjá sama kunda. Skráseting Føroya kann geva undantak frá hesum, um serligar umstøður eru.

*Stk. 2.* Fyri at fremja uppgávur, nevndar í § 1, stk. 2, kann grannskoðari ikki treyta sær

1) eina hægri samsýning fyri arbeiðið, enn mett verður rímiligt, ella
2) eina samsýning, hvørs rindan ella støðd verður treytað av øðrum viðurskiftum, enn gjørda arbeiðinum.

*Stk. 3.* Ásetingin í stk. 2 er eisini galdandi fyri samsýning fyri aðrar veitingar, tá grannskoðarin ella aðrir persónar í grannskoðanarvirkinum, ið eru knýttir at uppgávuni ella hava eftirlit við henni, samstundis fyri sama uppgávugevara hava eftirlit við ella eru knýttir at uppgávum sambært § 1, stk. 2.

## Kapittul 5
## Frágreiðing um gjøgnumskygni

**§ 25.** Eitt grannskoðanarvirki, ið ger uppgávur sambært § 1, stk. 2 í virkjum, sum § 19, stk. 3 fevnir um, skal almannakunngera eina árliga frágreiðing um gjøgnumskygni á síni heimasíðu innan 3 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað. Í frágreiðingini skal vera:

1) ein lýsing av løgfrøðiligu skipanini og ognarviðurskiftunum,
2) ein lýsing av leiðsluskipanini í grannskoðanarvirkinum,
3) um grannskoðanarvirkið er partur av einum netverki, ein lýsing av netverkinum og rættarligu og skipanarligu avtalunum hjá grannskoðanarvirkinum við netverkið,
4) upplýsingar um grundarlagið fyri samsýningini hjá partnarunum,
5) ein lýsing av innanhýsis góðskustýringarskipanini hjá grannskoðanarvirkinum, heruppií ein tilskilan av politikkinum fyri ávikavist óheftni og eftirútbúgving,
6) ein tilskilan av, nær seinasta góðskueftirlit varð gjørt, sbr. § 27,

7) ein váttan frá ovastu ábyrgdarleiðsluni í grannskoðanarvirkinum um, at góðskustýringarskipanin virkar á fullgóðan hátt, og at politikkurin viðvíkjandi óheftni verður hildin,
8) roknskaparupplýsingar, ið vísa støddina á grannskoðanarvirkinum, heruppií heildarumsetningin, býttur á samsýning fyri grannskoðan av roknskapum, samsýning fyri aðrar váttanaruppgávur við trygd, skattaráðgeving og aðrar veitingar, og
9) ein listi yvir virkir fevnd av § 19, stk. 3, sum grannskoðanarvirkið í roknskaparárinum frammanundan hevur gjørt uppgávur fyri sambært § 1, stk. 2.

*Stk. 2.* Ovasta ábyrgdarleiðslan í grannskoðanarvirkinum hevur ábyrgdina av, at upplýsingarnar eru rættar.

## Kapittul 6
## Góðskustýring og góðskueftirlit

**§ 26.** Grannskoðanarvirkir skulu hava eina góðskustýringarskipan og skulu kunna skjalprógva nýtsluna av henni.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um innihaldið av góðskustýringarskipanini og um skjalprógvið fyri nýtsluna av henni.

**§ 27.** Eitt grannskoðanarvirki og teir grannskoðarar, ið har starvast, hava skyldu til at geva seg undir góðskueftirlit. Grannskoðaraeftirlitið fremur góðskueftirlitið í samsvari við reglurnar í §§ 32-34.

*Stk. 2.* Góðskueftirlitið fevnir um eina meting av góðskustýringarskipanini, sbr. § 26, og um arbeiðið og óheftnið í sambandi við tær uppgávur, sum grannskoðarin ger sambært § 1, stk. 2.

*Stk. 3.* Góðskueftirlitið skal fara fram við í mesta lagi 6 ára millumbilum. Góðskueftirlitið skal tó fara fram við í mesta lagi 3 ára millumbilum í grannskoðanarvirkjum, ið grannskoða roknskapir hjá virkjum, sum § 19, stk. 3 fevnir um.

*Stk. 4.* Eitt grannskoðanarvirki, har góðskueftirlit fer fram, skal geva Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkinum høvi til at gera tær kanningar, ið mettar vera neyðugar, og skal síggja til, at Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkið fær tær upplýsingar og ta hjálp, ið verða mett neyðug fyri at fremja góðskueftirlitið. Grannskoðarar, ið eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, hava samsvarandi skyldur mótvegis Grannskoðaraeftirlitinum og eftirlitsfólkinum.

## Kapittul 7
## Tagnarskylda grannskoðarans

**§ 28.** §§ 144, 150-152f og 154-157 í revsilógini eru samsvarandi galdandi fyri grannskoðarar. Viðvíkjandi starvsfólkunum hjá hesum eru §§ 144, 152-152f og 155 í revsilógini galdandi.

*Stk. 2.* Hóast ásetingarnar í §§ 152-152 e í revsilógini, kann grannskoðari í einum dótturfelag lata víðari upplýsingar til samtøkugrannskoðaran í einum móðurfelag.

## Kapittul 8
## Grannskoðanarbólkur

**§ 29.** Virkir, hvørs virðisbrøv verða handlað á einum skipaðum marknaði í einum ES/EBS-landi, skulu seta ein grannskoðanarbólk, sbr. tó stk. 4, 5, 7 og 8. Í grannskoðanarbólkinum skulu vera nevndarlimir, ið ikki samstundis eru í stjórnini hjá virkinum. Í minsta lagi ein limur í grannskoðanarbólkinum skal bæði vera óheftur av virkinum og hava útbúgving innan roknskap ella grannskoðan.

*Stk. 2.* Uppgávurnar hjá grannskoðanarbólkinum skulu í minsta lagi vera:
1) at hava eftirlit við mannagongdini fyri roknskapargreiðslu,
2) at hava eftirlit við innanhýsis eftirlitsskipanini hjá virkinum, møguligari innanhýsis grannskoðan og við, at skipanir fyri váðastýring virka á fullgóðan hátt,
3) at hava eftirlit við lógbodnu grannskoðanini av ársroknskapinum v.m. og
4) at hava eftirlit við og kanna óheftnið hjá grannskoðaranum, sbr. § 22, heruppií serliga veitan av øðrum tænastuveitingum til virkið.

*Stk. 3.* Í virkjum, sum hava sett ein grannskoðanarbólk, skal uppskotið hjá nevndini um val av grannskoðara vera grundað á eitt tilmæli frá grannskoðanarbólkinum.

*Stk. 4.* Virkir, sum stk. 1, 1. pkt. fevnir um, kunnu tó velja at lata virksemið hjá grannskoðanarbólkinum gera av allari nevndini, um formaðurin í nevndini ikki er limur í stjórnini, og í minsta lagi ein nevndarlimur bæði er óheftur av virkinum og hevur útbúgving innan roknskap ella grannskoðan.

*Stk. 5.* Hóast ásetingina í stk. 4, kunnu virkir, ið eru fevnd av stk. 1, 1. pkt., velja at lata alla nevndina gera virksemið hjá grannskoðanarbólkinum, um formaðurin í nevndini ikki er limur í stjórnini, og um virkið í tveimum fylgjandi roknskaparárum á javnatíðspunktinum ikki fer upp um tvær av hesum treytum:
1) 250 starvsfólk í fulltíðarstarvi,
2) ein javna upp á 43 mió. evrur ella
3) ein nettoumsetning upp á 50 mió. evrur.

*Stk. 6.* Í virkjum, har øll nevndin fremur virksemið hjá grannskoðanarbólkinum, sbr. stk. 4 og 5, skal hetta standa í ársfrásøgnini.

*Stk. 7.* Stk. 1-6 eru ikki galdandi fyri íløgufeløg, serfeløg og virkir, sum eru dótturfeløg, um móðurfelagið er fevnt av krøvunum um setan av grannskoðanarbólki.

*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um grannskoðanarbólk í virkjum, sum eru undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum, heruppií reglur um, at frávik kann verða gjørt frá stk. 5 og 7.

## Kapittul 9
## Alment eftirlit v.m.

*Alment eftirlit*

**§ 30.** Skráseting Føroya hevur ábyrgdina av eftirlitinum við grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum.

*Stk. 2.* Skráseting Føroya hevur heruppií ábyrgdina av eftirlitinum við

1) próvtøku og eftirútbúgving, sbr. § 31,
2) góðskueftirliti, sbr. §§ 32-34,
3) kanningum, sbr. §§ 35-40,
4) dissiplinermálum, sbr. §§ 41-44, og
5) samstarvi við og flytan av upplýsingum til málsførar myndugleikar í øðrum londum, sbr. §§ 45 og 46.

*Stk. 3.* Skráseting Føroya kann í sambandi við sítt virksemi sambært stk. 1 og 2 útvega sær upplýsingar frá øðrum føroyskum og útlendskum málsførum myndugleikum og krevja neyðugar upplýsingar frá grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, heruppií latan av arbeiðsskjølum og øðrum skjølum viðvíkjandi uppgávum, framdar sambært § 1, stk. 2.

*Próvtøka og próvtøkunevndir*

**§ 31.** Skráseting Føroya setur eina próvtøkunevnd fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar.

*Stk. 2.* Próvtøkunevndin fyri løggildar grannskoðarar skal hava 1 løggildan grannskoðara og 4 ella fleiri limir, ið hvørki eru løggildir ella skrásettir grannskoðarar, og sum skulu vera kønir í handilsviðurskiftum, skattarætti, skiftirætti og tjóðarbúskapi.

*Stk. 3.* Próvtøkunevndin fyri løggildar grannskoðarar er eisini próvtøkunevnd fyri skrásettar grannskoðarar, tó soleiðis at í hesum førum skal, í staðin fyri løggilda grannskoðaran, skrásettur grannskoðari vera í nevndini.

*Stk. 4.* Skráseting Føroya velur ein av limunum í nevndini til formann, sum ikki kann vera løggildur ella skrásettur grannskoðari.

*Stk. 5.* Próvtøkunevndin hevur próvtøkur fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar.

*Stk. 6.* Avtala kann gerast við myndugleikar í øðrum londum um at veita hjálp í sambandi við próvtøkuhald og próvtøkudøming.

*Stk. 7.* Í staðin fyri teir í stk. 2 og 3 nevndu grannskoðarar kann Skráseting Føroya seta persónar í próvtøkunevndina, sum hava tikið útbúgving uttanlands, ið verður mett at kunna javnmetast við tað í § 3, stk. 1, nr. 4 og 5, sbr. stk. 3, nevndu útbúgving, og verður § 3, stk. 1, nr. 1 ikki nýtt í hesum førinum.

*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um próvtøku hjá løggildum og skrásettum grannskoðarum, sbr. § 3, stk. 1, nr. 4, heruppií um treytirnar fyri innstilling til próvtøku, próvtøkukrøvini, próvtøkuhald og -døming. Reglurnar skulu tryggja, at útbúgving fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar lúkur neyðug krøv til at kunna verða góðkend í einum ES- ella EBS-landi.

*Stk. 9.* Avgerðirnar hjá próvtøkunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

*Grannskoðaraeftirlitið*

**§ 32.** Skráseting Føroya setir eitt grannskoðaraeftirlit. Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri eftirlitið. Grannskoðaraeftirlitið hevur 1 formann og 8 aðrar limir. 2 limir skulu vera løggildir grannskoðarar, 2 skulu vera skrásettir grannskoðarar, og 4 skulu umboða roknskaparbrúkararnar. Hvørki formaðurin ella umboðini fyri roknskaparbrúkararnar kunnu vera góðkendir grannskoðarar ella vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við góðkendum grannskoðarum.

*Stk. 2.* Formaðurin í Grannskoðaraeftirlitinum og limirnir verða tilnevndir av Skráseting Føroya fyri eitt tíðarskeið upp til 4 ár.

*Stk. 3.* Grannskoðaraeftirlitið skal tryggja, at góðskueftirlitið sambært § 27 fer fram í samsvari við lógarinnar reglur. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um góðskueftirlitið, og um hvussu tað skal fara fram. Landsstýrismaðurin kann heruppií áseta serligar reglur um góðskueftirlitið í grannskoðanarvirkjum, ið fremja grannskoðan í virkjum, sum eru nevnd í § 19, stk. 3.

*Stk. 4.* Tær í stk. 3 nevndu reglur um fremjing av góðskueftirliti skulu m.a. hava leiðreglur um,

1) hvør kann fremja eftirlitið,
2) val av góðskueftirlitsfólkum, sbr. § 33,
3) val av grannskoðanarvirkjum, har góðskueftirlit skal fara fram, og
4) vavið á og fremjingina av góðskueftirlitinum.

*Stk. 5.* Útreiðslurnar av góðskueftirlitinum rindar Grannskoðaraeftirlitið fyribils, men tær skulu berast av tí grannskoðanarvirki, ið er góðskukannað. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um gjald fyri góðskueftirlitið.

**§ 33.** Grannskoðaraeftirlitið góðkennir teir grannskoðarar, ið fyri eitt 5 ára tíðarskeið kunnu fremja góðskueftirlit, sbr. § 32, stk. 4, nr. 1. Hesir verða nevndir góðskueftirlitsfólk. Eftirlitið førir ein lista yvir góðskueftirlitsfólkini. Skráseting Føroya kann í ítøkiligum førum tilnevna onnur enn grannskoðarar sum góðskueftirlitsfólk. Góðskueftirlitsfólk skulu hava hóskandi yrkisútbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu og hava neyðugan kunnleika til góðskueftirlit.

*Stk. 2.* Góðskueftirlitið skal fara fram í samsvari við tær reglur, sum eru ásettar um hetta, sbr. § 32, stk. 3 og 4.

*Stk. 3.* Tá góðskueftirlitið er endað, ger góðskueftirlitsfólkið eina frágreiðing, ið verður send Grannskoðaraeftirlitinum. Frágreiðingin skal innihalda eina lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið á kanningini og eina meting av úrslitinum av kanningini. Ger ein grannskoðari kanningina, verður frágreiðingin gjørd sum ein váttan sambært § 1, stk. 2.

*Stk. 4.* Grannskoðaraeftirlitið kann krevja tær upp-

lýsingar frá góðskueftirlitsfólkinum og tí, sum verður kannaður, ið eru neyðugar fyri, at eftirlitið kann taka støðu til, um tað hjá tí kannaða eru skeivleikar, manglar ella øki, har ábøtur kunnu verða gjørdar. Grannskoðaraeftirlitið kann somuleiðis krevja tær upplýsingar frá góðskueftirlitsfólkinum, ið eru neyðugar fyri, at góðskueftirlitið kann leggja eitt mál fyri Grannskoðaranevndina. Grannskoðaraeftirlitið kann, um tað verður mett neyðugt, sjálvt gera eftirlitsvitjanir ella taka lut í eftirlitsvitjan saman við einum góðskueftirlitsfólki.

*Stk. 5.* Grannskoðaraeftirlitið tekur støðu til, um eftirlitið hjá tí kannaða gevur høvi til
1) at eftirlitið verður endað uttan fleiri viðmerkingar,
2) átalu uttan onnur tiltøk innan næstu vanligu eftirlitsvitjan ella
3) átalu við eftirlitsvitjan, ið skal vísa, um viðurskiftini eru komin í rættlag.

*Stk. 6.* Grannskoðaraeftirlitið tekur eisini støðu til, um komið er fram á skeivleikar ella manglar hjá teimum kannaðu, sum geva orsøk til at leggja málið fyri Grannskoðaranevndina, sbr. § 41.

*Stk. 7.* Grannskoðaraeftirlitið gevur út eina árliga frágreiðing um arbeiðið hjá eftirlitinum.

*Stk. 8.* Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalu við donsku myndugleikarnar um, at tað í § 27 nevnda góðskueftirlit verður framt av góðskueftirltisfólki, sum danska Revisortilsynet hevur góðkent sambært lov om godkendte revisorer og revisionsvirksomheder (revisorloven), og at góðskueftirlitsfólkini fremja eftirlitið við ábyrgd og undir eftirliti av danska Revisortilsynet, og at tey virki, ið verða vald út til eftirlit, verða vald út eftir tilmæli frá danska Revisortilsynet.

*Stk. 9.* Góðskueftirlitsfólk sambært stk. 8, hava tær heimildir, sum ásettar eru í hesi lóg og reglum, settar sambært lógini.

*Stk. 10.* Verður avtala gjørd sambært stk. 8 hevur landsstýrismaðurin heimild til í kunngerð at gera frávik frá §§ 33 og 34.

**§ 34.** Limirnir í Grannskoðaraeftirlitinum, góðskueftirlitsfólkini og onnur, sum eru við í arbeiðinum við góðskueftirlitinum, koma undir reglurnar um óheftni grannskoðarans, sbr. § 22.

*Stk. 2.* §§ 152, 152 a og 152 c-152 f í revsilógini eru galdandi fyri limir í Grannskoðaraeftirlitinum, góðskueftirlitsfólkini og onnur, sum eru við í arbeiðinum við góðskueftirlitinum, viðvíkjandi upplýsingum um fíggjarligu, vinnuligu ella privatu viðurskiftini hjá einum likamligum ella løgfrøðiligum persóni, sum teir verða kunnugir við í sambandi við sítt arbeiði.

*Stk. 3.* Hóast ásetingarnar í §§ 152-152 e í revsilógini, kunnu góðskueftirlitsfólkini lata víðari upplýsingar til Grannskoðaraeftirlitið, eins og Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkini kunnu lata víðari upplýsingar til Grannskoðaranevndina.

*Stk. 4.* Hóast ásetingarnar í stk. 2, kunnu Grannskoðaraeftirlitið, góðskueftirlitsfólkini og onnur, sum hava verið við í arbeiðinum við góðskueftirlitinum, lata víðari upplýsingar til Skráseting Føroya sambært § 30, stk. 3.

*Kanningar*

**§ 35.** Um Skráseting Føroya metir, at vandi er fyri, at ein grannskoðari ella eitt grannskoðanarvirki hevur brotið ella fer at bróta reglur í ella sambært hesi lóg, kann Skráseting Føroya seta í verk og fremja eina kanning við tí fyri eyga at staðfesta, rætta ella forða einum slíkum broti. Hetta er ikki galdandi fyri eina váttan sambært § 1, stk. 3. Skrásetingin kann eisini seta í verk eina kanning, um hon verður biðin um tað av einum málsførum útlendskum myndugleika, sbr. § 30, stk. 2, nr. 5.

*Stk. 2.* Skráseting Føroya kann taka avgerð um at nýta uttanhýsis hjálp í sambandi við eina kanning sambært stk. 1.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um íverksetan og fremjing av kanningum sambært stk. 1.

**§ 36.** Skráseting Føroya kann krevja allar upplýsingar frá grannskoðaranum ella grannskoðanaravirkinum, heruppií arbeiðsskjøl, grannskoðanarprotokollir, brævaskifti og onnur skjøl, ið verða mett neyðug, tá Skráseting Føroya skal gera av, um tað eru hend ella fara at henda brot á reglurnar í hesi lóg, reglur ásettar sambært hesi lóg ella reglur um skyldur grannskoðarans, ásettar í aðrari lóggávu.

**§ 37.** Skráseting Føroya hevur til eina og hvørja tíð við hóskandi samleikaprógvi uttan rættarúrskurð atgongd til eitt grannskoðanarvirki og til skrásetingar, skjøl v.m., heruppií eisini tilfar, ið verður varðveitt elektroniskt, fyri at fáa til vega upplýsingar, ið eru neyðugar í sambandi við kanning sambært § 35.

*Stk. 2.* Stk. 1 er ikki galdandi fyri bygningar ella partar av bygningum, ið einans verða nýttir til privatan bústað.

*Stk. 3.* Um neyðugt, veitir løgreglan hjálp til kanningar sambært stk. 1. Landsstýrimaðurin kann í samráð við Føroya Landfúta áseta reglur hesum viðvíkjandi.

*Stk. 4.* Skráseting Føroya kann, tá ein kanning verður gjørd sambært § 35, stk. 1, 3. pkt. loyva, at starvsfólk frá viðkomandi útlendska myndugleika fylgja Skráseting Føroya.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um luttøku hjá starvsfólki frá útlendskum myndugleikum sambært stk. 4.

**§ 38.** Tá kanning er endað, tekur Skráseting Føroya støðu til, um úrslitið av kanningini gevur høvi til
1) at geva eina átalu,
2) at krevja, at brot skulu steðga, ella
3) at leggja grannskoðaran, grannskoðanarvirkið ella bæði fyri Grannskoðaranevndina, sbr. § 41.

**§ 39.** Skráseting Føroya kann gera av, at úrslitið av kanningini sambært § 38 skal almannakunngerast, og hvussu almannakunngeringin skal fara fram. Almannakunngeringin fer fram á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya.

**§ 40.** Skráseting Føroya kann sum tvingsilsráð áleggja limum í nevndini ella stjórnini ella øðrum, sum hava líknandi ábyrgd í grannskoðanarvirkinum, og grannskoðarum dag- ella vikubøtur, um tey lata vera við at

1) fylgja eini áheitan um upplýsingar sambært § 36 ella
2) gera eftir boðum frá skrásetingini sambært § 38.

*Stk. 2.* Tvingsilsbøturnar, ið fella til landskassan kunnu heintast inn við panting ella verða hildnar aftur í løn v.m. eftir skattalógini.

*Grannskoðaranevndin*

**§ 41.** Skráseting Føroya setir eina grannskoðaranevnd. Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri nevndina. Grannskoðaranevndin hevur 1 formann, ið skal vera løgfrøðingur, og í minsta lagi 8 aðrar limir, harav 2 skulu vera løggildir grannskoðarar, 2 skulu vera skrásettir grannskoðarar, og 4 skulu umboða roknskaparbrúkararnar. Verður talið økt, skulu lutfalsliga líka nógvir løggildir grannskoðarar sum skrásettir grannskoðarar verða tilnevndir, eins og talið á umboðum fyri roknskaparbrúkararnar lutfalsliga skal varðveitast. Formaðurin og limirnir í nevndini verða tilnevndir av Skráseting Føroya, ið somuleiðis kann tilnevna ein ella fleiri løgfrøðingar sum næstformenn. Formansskapurin og limirnir verða tilnevndir fyri eitt tíðarskeið, sum kann vera upp til 4 ár.

*Stk. 2.* Tá Grannskoðaranevndin viðger mál, sum viðvíkja løggildum grannskoðarum, skal umframt formannin ella næstformannin í minsta lagi luttaka 1 løggildur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar. Tá nevndin viðger mál viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum, skal umframt formannin ella næstformannin í minsta lagi luttaka 1 skrásettur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar. Luttaka fleiri limir, skal talið av grannskoðarum samsvara við talið av umboðum fyri roknskaparbrúkararnar. Í málum, har rættindafrádøming kann koma upp á tal, sbr. § 42, stk. 2 og 4, skulu umframt formannin, altíð vera í minsta lagi 2 løggildir grannskoðarar ávikavist 2 skrásettir grannskoðarar og eitt samsvarandi tal av limum, umboðandi roknskaparbrúkararnar, við í viðgerðini.

*Stk. 3.* Kærur um, at ein grannskoðari, tá hann ger uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3, hevur sett til síðis tær skyldur, sum starvið hevur við sær, kunnu leggjast fyri Grannskoðaranevndina. Sama er galdandi fyri kærur um grannskoðarar, sum eru skrásettir sambært § 11, stk. 2, og kærur um viðurskifti, nevnd í § 42, stk. 2, 2. pkt. Kærur um samsýning grannskoðarans og kollegial mál kunnu ikki leggjast fyri Grannskoðaranevndina.

*Stk. 4.* Kærur um grannskoðanarvirkir viðvíkjandi viðurskiftum, sum nevnd í § 42, stk. 4, 3. pkt, kunnu leggjast fyri Grannskoðaranevndina.

*Stk. 5.* Grannskoðaraeftirlitið kann skjóta eitt grannskoðanarvirki inn fyri Grannskoðaranevndina, um virkið ikki hevur gjørt leiðreglur um óheftni, sbr. § 22, stk. 6, ikki hevur eina góðskutrygdarskipan, sbr. § 26, ella um tað aðramáta í sambandi við fremjing av góðskueftirliti eru funnir skeivleikar ella manglar hjá virkinum, sum eftir meting Grannskoðaraeftirlitsins geva orsøk til at leggja málið fyri nevndina. Skráseting Føroya kann eisini skjóta eitt grannskoðaravirki inn fyri Grannskoðaranevndina, um skrásetingin í sambandi við eina kanning, sbr. § 35, finnur skeivleikar og manglar hjá virkinum, sum skrásetingin metir geva orsøk til tað.

*Stk. 6.* Grannskoðaranevndin ella formaðurin kann nokta at viðgera kærur frá persónum, ið ikki hava ein rættarligan áhuga í teimum viðurskiftum, kæran viðvíkur, og kærur, sum frammanundan verða mettar ógrundaðar. Hevur Skráseting Føroya, Fíggjareftirlitið, Fíggjarmálaráðið, ákæruvaldið, Felagið fyri løggildar grannskoðarar, Felagið fyri skrásettar grannskoðarar ella Grannskoðaraeftirlitið latið kæruna inn, skal Grannskoðaranevndin viðgera kæruna. Hevur grannskoðari gjørt arbeiði sambært § 1, stk. 2 og 3 fyri eina kommunu ella ein kommunalan felagsskap, og kærir kommunan ella kommunali felagsskapurin um framda arbeiðið, skal Grannskoðaranevndin viðgera kæruna.

*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at kærarin skal rinda Grannakoðaranevndini eitt gjald fyri at fáa eina kæru viðgjørda. Onki gjald skal rindast fyri kærur sambært stk. 6, 2. og 3. pkt.

**§ 42.** Ein grannskoðari, ið setir til síðis tær skyldur, ið fylgja við starvinum, tá hann fremur uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3, kann frá Grannskoðaranevndini fáa eina ávaring ella eina bót upp á í mesta lagi 300.000 kr.

*Stk. 2.* Um ein grannskoðari er sekur í grovum ella ofta endurtakandi vansketni í útinningini av sínum virksemi, og tað, sum er gjørt, gevur orsøk til at halda, at viðkomandi í framtíðini ikki fer at røkja virksemið á forsvarligan hátt, kann Grannskoðaranevndin frádøma góðkenningina í eitt tíðarskeið frá 6 mánaðum til 5 ár, ella til annað verður avgjørt. Sama er galdandi, um umdømi grannskoðarans er gjørt so álvarsliga til skammar, at stórur vandi er fyri, at grannskoðarin ikki kann røkja starvið sum álitisumboð hjá almenninginum á forsvarligan hátt. Í avgerðini skal upplýsast, at avgerðin sambært § 49 kann verða løgd fyri rættin og um freistina fyri hesum.

*Stk. 3.* Grannskoðaranevndin kann lata avhoyring av pørtum og vitnum fara fram við Føroya Rætt ella við býarrættin, har sum parturin ella vitnið býr.

*Stk. 4.* Um tað áliggur einum grannskoðanarvirki ein sjálvstøðug ábyrgd, sbr. § 41, stk. 5, ella ein medábyrgd fyri, at grannskoðarin ikki hevur hildið sínar

skyldur, sbr. stk. 1, kann grannskoðanarvirkið fáa eina ávaring ella eina bót, upp á í mesta lagi 750.000 kr. Um tað áliggur grannskoðanarvirkinum ein medábyrgd, kunnu revsitiltøkini einans verða áløgd virkinum, um virkið er tikið við sum partur í einum kærumáli hjá Grannskoðaranevndini. Um umdømið hjá einum grannskoðanarvirki er gjørt so álvarsliga til skammar, at stórur vandi er fyri, at grannskoðanarvirkið ikki kann røkja uppgávuna á forsvarligan hátt, kann Grannskoðaranevndin frádøma góðkenningina í eitt tíðarskeið frá 6 mánaðum til 5 ár, ella til annað verður avgjørt. Í eini avgerð tikin sambært 3. pkt. skal upplýsast, at avgerðin sambært § 49 kann leggjast fyri rættin og um freistina fyri hesum.
*Stk. 5.* Formaðurin í Grannskoðaranevndini kann í stórum og torførum málum velja ein serkønan at leggja málið fram og gera avhoyringar fyri nevndina. Hevur ein almennur myndugleiki lagt málið fyri, rindar viðkomandi myndugleiki útreiðsluna til tann serkøna.
*Stk. 6.* Avgerðir hjá Grannskoðaranevndini skulu almannakunngerast.
*Stk. 7.* Bøtur, ið eru álagdar sambært stk. 1 og 4, kunnu innheintast við panting. Peningurin fer í landskassan.

**§ 43.** Grannskoðaranevndin kann til eina og hvørja tíð eftir umsókn seta úr gildi eina frádøming, ið er gjørd sambært § 42, stk. 2 ella 4. Er frádømingin gjørd, til annað verður avgjørt, og sýtir nevndin eini umsókn um úrgildissetan av frádømingini, kann grannskoðarin ávikavist grannskoðanarvirkið krevja, at avgerðin verður roynd í rættinum, um farin eru fimm ár eftir frádømingina og í minsta lagi 2 ár eftir, at góðkenningin seinast er noktað við dómi. § 42, stk. 2, 3. pkt., stk. 4, 4. pkt. og § 50, stk. 1 verða at nýta samsvarandi.

**§ 44.** Freistin fyri at leggja eitt mál fyri Grannskoðaranevndina er 5 ár roknað frá tí degi, tann skeiva framferðin ella undanlátið helt uppat.
*Stk. 2.* Freistin verður brotin, tá kæra verður latin Granskoðaranevndini.

*Tagnarskylda og umskifti av upplýsingum*

**§ 45.** Starvsfólk hjá Skráseting Føroya hava undir ábyrgd eftir §§ 152-152 e í revsilógini skyldu til at halda loyniligar trúnaðarupplýsingar, sum tey fáa kunnleika til í sínum eftirlitsarbeiði. Tagnarskyldan fevnir harumframt um persónar, ið gera tænastuuppgávur fyri Skráseting Føroya, serkøn, ið virka vegna Skráseting Føroya, og persónar, ið eru við Skráseting Føroya, tá kanning verður gjørd, sbr. § 37, stk. 4. Hetta er eisini galdandi eftir, at setanarviðurskiftini ella sáttmálaviðurskiftini eru hildin uppat.
*Stk. 2.* Samtykki frá honum, sum tagnarskyldan er ætlað at verja, heimilar ikki teimum persónum, sum nevndir eru í stk. 1, at lata víðari trúnaðarupplýsingar.
*Stk. 3.* Trúnaðarupplýsingar, sum Skráseting Føroya fær sambært hesum kapitli, kunnu einans verða nýttar í sambandi við eftirlitsuppgávuna, til at áleggja revsitiltøk, ella um avgerðir hjá Skráseting Føroya verða kærdar til hægri fyrisitingarligan myndugleika ella verða lagdar fyri rættin.
*Stk. 4.* Hóast stk. 1 og 3, kunnu trúnaðarupplýsingar og skjøl latast víðari til
1) Grannskoðaraeftirlitið og Grannskoðaranevndina, so hesi kunnu røkja sínar uppgávur sambært hesi lóg,
2) Fondsráðnum og tess avgreiðsluskrivstovu
3) aðrar almennar myndugleikar, heruppií ákæruvaldið og løgregluna,
4) eftirlitsmyndugleikar fyri grannskoðarar og grannskoðanarvirkir í londum, sum Føroyar hava gjørt sínamillum avtalu við, ið hava ábyrgdina av eftirliti við góðkenning, skráseting, góðskueftirliti, kanningum og haldan av reglum, við teirri fortreyt, at móttakararnir av upplýsingunum einans nýta hesar til tess at røkja sínar uppgávur,
5) eftirlitsmyndugleikar fyri grannskoðarar og grannskoðanarvirkir í øðrum londum enn teimum, ið eru nevnd í nr. 4, til tess at røkja uppgávur innan alment eftirlit ella góðskueftirlit ella í sambandi við eina kanning, sbr. tó stk. 5 og 6.
*Stk. 5.* Víðarilatan av upplýsingum sambært stk. 4, nr. 5, kann einans fara fram
1) um upplýsingarnar ella skjølini viðvíkja grannskoðan av virkjum, sum
   a) hava givið út virðisbrøv í viðkomandi landi ella
   b) eru partar av einum samtaki, ið ger lógbodnan samtøkuroknskap í viðkomandi landi,
2) um avtala er gjørd um sínámillum samstarv við viðkomandi land,
3) um endamálið við áheitanini kann rættvísgerast,
4) við teirri fortreyt, at móttakararnir í minsta lagi koma undir ein lógarásetta tagnarskyldu, ið samsvarar tagnarskylduni í stk. 1, og einans kunnu nýta upplýsingarnar og skjølini til at røkja sítt virksemi innan alment eftirlit ella góðskueftirlit ella í sambandi við eina kanning, og
5) um víðarilatan er í samsvari við lóg um viðgerð av persónsupplýsingum.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um treytirnar í stk. 5.
*Stk. 7.* Hóast stk. 4, kunnu upplýsingar, sum Skráseting Føroya hevur fingið frá einum útlendskum málsførum myndugleika, einans latast víðari til Grannskoðaraeftirlitið, Grannskoðaranevndina og ákæruvaldið.

**§ 46.** Skráseting Føroya kann skifta um neyðugar upplýsingar við aðrar málsførar myndugleikar í einum landi, sum er fevnt av sínamillum avtalu millum Føroyar og ES, EBS ella einstøk lond, um
1) grannskoðarar, ið eru góðkendir í Føroyum, sbr. § 3, stk. 1, og sum søkja um loyvi til at byrja virksemi sum grannskoðarar í einum landi, sum Føroyar hava gjørt sínamillum avtalu við,

2) grannskoðarar, ið eru góðkendir í Føroyum, sbr. § 3, stk. 1, og sum ætla fyribils og av og á at lata tænastuveitingar í einum landi, sum Føroyar hava gjørt sínamillum avtalu við,
3) grannskoðarar, ið eru góðkendir og hava bústað í einum landi, sum Føroyar hava gjørt sínámillum avtalu við, og sum søkja um loyvi at byrja virksemi sum grannskoðarar í Føroyum sambært § 10, stk. 1, og
4) grannskoðarar, ið eru góðkendir og hava bústað í einum landi, sum Føroyar hava gjørt sínámillum avtalu við, og sum ætla fyribils og av og á at lata váttanir í Føroyum sambært § 11, stk. 1

*Stk. 2.* Við málsføran myndugleika í stk. 1 er í hesi lóg at skilja tann myndugleiki, ið umsitur grannskoðarayrkið í viðkomandi landi.

*Stk. 3.* Tær upplýsingar, sum kunnu skiftast um, skulu vera neyðugar, fyri at Skráseting Føroya og hinir málsføru myndugleikarnir í nevndu londum kunnu røkja sínar uppgávur sambært stk. 1.

*Stk. 4.* Tá Skráseting Føroya skiftir um upplýsingar sambært stk. 1, skulu reglurnar í lóg um viðgerð av persónsupplýsingum vera hildnar. Upplýsingarnar skulu viðgerast í trúnaði.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetir reglur um umskifti av upplýsingum við aðrar málsførar myndugleikar sambært stk. 1.

*Fígging av góðskueftirliti og kanningar- og dissiplinerskipan*

**§ 47.** Landsstýrismaðurin kann áseta, at góðskueftirlitið og kanningar- og dissiplinerskipanin verða fíggjað við innkrevjing av gjaldi frá øllum góðkendum grannskoðarum, ið eru knýttir at einum grannskoðanarvirki.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann gera av, at grannskoðarar, sbr. § 11, stk. 1, skulu rinda eitt gjald, ið er við til at fíggja Grannskoðaranevndina.

*Stk. 3.* Tey í stk. 1 og 2 nevndu gjøld kunnu innheintast við panting. Peningurin fer í landskassan

## Kapittul 10
## Kæra

**§ 48.** Avgerðir, sum Skráseting Føroya hevur tikið sambært lógini ella reglum, givnum við heimild í lógini, kunnu verða lagdar fyri Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar sambært §§ 35-37, kunnu tó ikki verða lagdar fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.

*Stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Grannskoðararáðnum, Grannskoðaraeftirlitinum ella Grannskoðaranevndini, kunnu ikki verða lagdar fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.

**§ 49.** Tann, sum ein avgerð eftir § 8, stk. 1, og § 42, stk. 2 og stk. 4, 3. pkt. viðvíkur, kann krevja, at avgerðin verður løgd fyri rættin. Áheitan um hetta skal vera Skráseting Føroya í hendi í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Skráseting Føroya leggur sak móti viðkomandi eftir borgarligu rættargangslógini.

*Stk. 2.* Áheitan um, at málið verður lagt fyri rættin sambært § 8, stk. 1, hevur ikki steðgandi virknað, men rætturin kann við úrskurði gera av, at viðkomandi, meðan málið verður viðgjørt, kann útinna uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3.

*Stk. 3.* Verður dómur kærdur, sbr. stk. 2, sambært hvørjum ein frátøka ikki verður mett lóglig, kann tann rættur, ið hevur felt dómin, ella tann rættur, sum málið er lagt fyri, gera av, at ein grannskoðari ikki kann útinna tær í § 1, stk. 2 og 3 nevndu uppgávur, meðan kærumálið verður viðgjørt.

*Stk. 4.* Áheitan um, at avgerðin verður løgd fyri rættin sambært § 42, stk. 2 og stk. 4, 3. pkt., hevur steðgandi virknað, men rætturin kann við úrskurði gera av, at viðkomandi, meðan málið verður viðgjørt, ikki kann reka virksemi sum løggildur ávikavist skrásettur grannskoðari, ella at váttanir ikki kunnu verða givnar gjøgnum viðkomandi grannskoðanarvirki. Verður avgerðin hjá nevndini við dóminum mett lóglig, kann í hesum verða ásett, at kæra ikki hevur steðgandi virknað.

## Kapittul 11
## Freistir

**§ 50.** Tær freistir, ið eru ásettar í ella sambært hesi lóg, byrja frá og við degnum eftir tann dag, tá hendingin, ið útloysir freistina, fer fram. Hetta er galdandi bæði, tá dags-, viku-, mánaða- og ársfreistir skulu roknast.

*Stk. 2.* Er freistin givin í vikum, gongur freistin, sbr. stk. 1, út á vikudegnum fyri tí degi, tá hendingin, sum útloysti freistina, fór fram.

*Stk. 3.* Er freistin givin í mánaðum, gongur freistin, sbr. stk. 1, út á mánaðardegnum fyri tí degi, tá tann hendingin, ið útloysti freistina, fór fram. Um tann dagurin, tá hendingin, ið útloysti freistina, fór fram, er tann síðsti dagurin í einum mánaði, ella um freistin gongur út á einum mánaðardegi, sum ikki er, gongur freistin altíð út á síðsta degi í mánaðinum uttan mun til longdina.

*Stk. 4.* Er freistin givin í árum, gongur freistin, sbr. stk. 1, út á ársdegnum fyri tí degi, tá hendingin, sum útloysti freistina, fór fram.

*Stk. 5.* Gongur freistin út í einum vikuskifti, ein halgidag, grundlógardagin, jólaaftan ella nýggjársaftan, verður freistin longd til komandi gerandisdag.

## Kapittul 12
## Revsireglur

**§ 51.** Brot á § 5, § 9, stk. 1, § 11, stk. 1 og stk. 2, 1. pkt., §§ 18-24 og § 29, stk. 1, 3, 4, og 6 verða revsað við bót.

*Stk. 2.* Í fyriskipanum, givnar av Skráseting Føroya ella landsstýrismanninum sambært lógini, kann verða ásett revsing við bót fyri brot á reglurnar í fyriskipanunum.
*Stk. 3.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd eftir reglunum í kapittli 5 í revsilógini.
*Stk. 4.* Ein grannskoðari, ið, tá hann útinnir uppgávur sambært § 1, stk. 2 og 3, gevur skeiva skrivliga váttan ella skrivliga vissu um nakað, sum hann ongan kunnleika hevur um, verður revsaður við bót, hefti ella fongsli í upp til 4 mánaðir. Sama er galdandi fyri ein grannskoðara, ið undirskrivar grannskoðanaráteknngina í einum roknskapi, sum ikki er grannskoðaður av viðkomandi, uttan at hetta framgongur av givnu grannskoðanarváttanini, ella, sum uttan at vera knýttur at einum grannskoðanarvirki, fremur tær í § 1, stk. 2 nevndu uppgávur.
*Stk. 5.* Ein grannskoðari, ið gevur váttanir sambært § 11, stk. 1, 1. pkt., uttan at hava givið fráboðan um skráseting til Skráseting Føroya sambært § 11, stk. 2, verður revsaður við bót ella fongsli í upp til 4 mánaðir.
*Stk. 6.* Ásetingin í stk. 5 er samsvarandi galdandi fyri grannskoðarar, ið eru skrásettir sambært § 11, stk. 3, men sum geva váttanir, sum eru nevndar í § 11, stk. 1, 2. pkt.

## Kapittul 13
## Gildiskoma og skiftisreglur v.m.

**§ 52.** Henda lóg kemur í gildi tann 1. juli 2009, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* § 4 kemur í gildi 1. januar 2010.

**§ 53.** Upplýsingar í grannskoðanarprotokollum, sbr. § 19, stk. 1 og 2, skulu gevast fyrstu ferð í grannskoðanarprotokollum, ið viðvíkja komandi roknskaparárinum hjá grannskoðaða virkinum, ið byrjar 1. juli 2009 ella seinni.
*Stk. 2.* Í § 23 verður 7 ára tíðarskeiðið roknað frá komandi regluliga aðalfundinum, ið varð hildin eftir 1. januar 2008, í tí grannskoðaða virkinum.
*Stk. 3.* Ein frágreiðing um gjøgnumskygni, sbr. § 25, skal almannakunngerast fyrstu ferð innan 3 mánaðir eftir, at komandi roknskaparár, ið byrjar 1. juli 2009 ella seinri, er úti.
*Stk. 4.* Ásetingin í § 29 um grannskoðanarbólk hevur virknað frá komandi regluliga aðalfundinum, ið verður hildin eftir 31. desember 2009.

**§ 54.** Samstundis, sum henda lóg fær gildi, fer løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar úr gildi, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 2.* Kunngerðir, ið eru gjørdar við heimild í lógini nevnd í stk. 1, verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi, ella nýggjar reglur við heimild í hesi lóg koma ístaðin.
*Stk. 3.* Loyvir, ið eru givin sambært § 12, stk. 5 í løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar, vera verandi í gildi, til givnu loyvini ganga út.
*Stk. 4.* Í málum, har Dissiplinernevndin higartil hevur verið málsfør at viðgera brot á lóg um løggildar og skrásettar grannskoðarar, verða mál um brot, ið eru framd innan gildiskomu lógarinnar, viðgjørd sambært higartil galdandi reglum. Mál, sum innan gildiskomu lógarinnar eru løgd fyri Dissiplinernevndina, verða liðugt viðgjørd í teirri sambært § 41 stovnaðu Grannskoðaranevnd.
*Stk. 5.* Góðskueftirlit, ið er byrjað innan gildiskomu lógarinnar, verður viðgjørt sambært higartil galdandi reglum.

Tórshavn,11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Jóhan Dahl (sign.)

Lm. nr. 148/2008

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eldsbruna o.a.

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 106 frá 12. desember 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 4 verður sum stk. 6 sett: „*Stk. 6*. Kommunur, sum eru felags um eitt sløkkilið, kunnu avtala at hava felags brunanevnd við í minsta lagi 3 kommunalum limum.“

§ 24, stk. 3 verður orðað soleiðis: „*Stk. 3.* Vísir sýningin, at tað fyriliggja viðurskifti, sum kunnu elva til serligan vanda fyri brunatrygdina, kann eftirlitsmaðurin forbjóða virkseminum ella forbjóða, at bygningar ella partar av bygningi, hølum ella mannaverki verða nýtt, til bøtt er um brekið, og sýningin vísir, at hetta er gjørt á fullgóðan hátt.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer allur tann danski teksturin í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a. úr gildi.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Jacob Vestergaard (sign.)

Lm. nr. 119/2008

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Løgtingið

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 5 frá 7. mars 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„Valrætt til Løgtingið hevur hvør, ið fylt hevur 18 ár, hevur danskan heimarætt og er heimahoyrandi í Føroyum, uttan so er, at hann er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6.“

**2)** Yvirskriftin til kapittul III verður orðað soleiðis: „**III. Vallistar og valkort**“

**3)** Í § 3, 2. pkt. verður aftaná „øki“ sett: „sær“.

**4)** Í § 3, 1. pkt., § 20, stk. 1, 4. pkt., § 20, stk. 2, 1. pkt., § 41, 1. pkt. verður „bygdarráðið/býráðið“ broytt til: „kommunustýrið“.

**5)** § 4 verður orðað soleiðis:
**“§ 4.** Vallistarnir skulu hava teigar til raðnr., navn, aldur, starv, bústað og til at seta kross við. Nøvnini verða sett í bókstavarøð.“

**6)** § 6 verður orðað soleiðis:
**„§ 6.** Skjótast til ber, aftan á at valið er útskrivað, skulu vallistarnir leggjast fram til alment eftirlit og liggja frammi í minsta lagi í eina viku á einum staði ella eftir umstøðunum á fleiri støðum í kommununi, sum liggja høgliga fyri hjá íbúgvunum.
*Stk. 2.* Beint sum vallistarnir eru gjørdir, sendir kommunustýrið valkort til teir veljarar, sum eru førdir á vallista í kommununi. Á valkortinum skal verða upplýst navn og bústaður veljarans og raðnr. á vallista umframt kunning um valstað, valdag og upplatingartíðir.
*Stk. 3.* Í seinasta lagi 10 dagar áðrenn valið, kunnger landsstýrismaðurin dag og tíð fyri valið. Samstundis skal landsstýrismaðurin kunna um, at:
1) vallistar liggja frammi til alment eftirlit,
2) valkort verða send út, og
3) til avvarðandi kommunur skulu stílast kærur um:
   a) at persónur ikki er komin á vallistan,
   b) at persónur av órøttum er tikin við, og
   c) um manglandi valkort ella valkort við feili ella mangli.“

**7)** § 7 verður orðað soleiðis:
**„§ 7.** Kommunustýrið skal uttan drál viðgera innkomnar kærur sambært § 6. Vísir tað seg, at mangul ella feilir eru í valkorti ella vallista, skal mangul ella feilur rættast við at útskriva nýtt valkort, og rætting gerast í vallista. Tílíkir feilir kunnu rættast til og við valdagin.“

**8)** § 8 verður orðað soleiðis:
**„§ 8.** Persónur, sum stendur á vallista, skal, um hann meldar flyting úr kommununi, strikast á vallistanum í tí kommununi, hann flytur úr, og setast á vallista í tí kommunu, hann flytur til.
*Stk. 2.* Striking av vallista ella upptøka á vallista kann tó ikki fara fram minni enn 14 dagar áðrenn valið.“

**9)** Í § 8 a, stk. 1, 3 pkt., § 14, stk. 2, § 31, stk. 4, § 49, stk. 2 verður „landsstýrinum“ broytt til: „landsstýrismanninum“.

**10)** Í § 8 a, stk. 3, § 12, 1. pkt., § 20, stk. 1, 2. pkt., § 21, 2. pkt., § 36, stk. 4, § 38, stk. 1, § 39, stk. 1, 1. pkt., § 39, stk. 2, nr. 1, 3 pkt., § 42, stk. 2, 2. pkt., § 43, nr. 3 verður „landsstýrið“ broytt til: „landsstýrismaðurin“.

**11)** Í § 12 verður sum stk. 2 sett:
„*Stk. 2.* Løgtingslimur ella valevni, kann ikki vera limur ella tiltakslimur í løgtingsvalnevndini. Er valnevndin ikki fullmannað, tilnevnir stýrismaðurin nýggjar limir“.

**12)** Í § 12, 3. pkt. verður „landsstýrisins“ broytt til: „landsstýrismansins“.

**13)** § 13, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Valnevndin ansar eftir, at valstýrini á teimum einstøku valstøðunum hava alt greitt til atkvøðugreiðsluna. Við at spyrja seg fyri hjá formonnunum fyri valstýrunum, tryggjar nevndin sær, at vallistarnir eru tøkir til nýtslu undir atkvøðugreiðsluni. Valnevndin sendir skjótast gjørligt, aftan á at freistin at senda valevnislistar inn er lokin, valstýrinum tað neyðuga talið av atkvøðuseðlum. Kommunurnar hava skyldu at ávísa hølir til atkvøðugreiðsluna og at útvega neyðugt tal av atkvøðukøssum og atkvøðurúmum, sum lúka treytirnar í § 20, stk. 2.“

**14)** § 14, stk. 1, 2. pkt. verður strikað, og orðið „Bókin“ í 3. pkt. verður broytt til „Gerðabókin“.

**15)** Í § 15, stk. 2, 1. pkt. verður „6 “ og „8“ broytt til: „4“ og „5“.

**16)** Í § 15, stk. 2, 2. pkt. verður „6“ broytt til: „4“.

**17)** § 15, stk. 2, 3. pkt. verður orðað soleiðis: „Valnevndin sendir skjótast gjørligt øllum valstýrum fráboðan frá hesum.“

**18)** § 15, stk. 3 verður orðað soleiðis:
*„Stk. 3.* Tá ið val til Løgtingið skal fara fram, boðar løgtingsformaðurin skjótast til ber og í seinasta lagi eina viku eftir, at val er útskrivað, landsstýrismanninum frá, hvørjir flokkar við seinasta løgtingsval fingu umboðan á tingi og framvegis eru umboðaðir har. Í seinasta lagi kl. 18.00 dagin eftir, at valið er útskrivað, kunnu í minsta lagi 800 veljarar boða landsstýrismanninum frá stovnan av nýggjum flokki, sum tekur lut í valinum.“

**19)** Í § 15, stk. 4 verður sum 3. pkt. sett: „Veljarin skal vera lýstur við navni, føðingardegi, bústaði, dagfesting og undirskrift.“

**20)** § 17, stk. 3 verður orðað soleiðis:
*„Stk. 3.* Valevnini skulu vera lýst við navni, p-tali, starvi og bústaði. Nøvnini verða sett í bókstavarøð. Um valevni ikki ynskir at verða sett við fullum navni á atkvøðuseðilin, skal tað tilskilast, hvussu navnið skal setast á.
Eftirnavn ella millumnavn umframt í minsta lagi eitt fornavn ella forbókstavur hjá valevni skal altíð setast á atkvøðuseðilin. Bert millum- og eftirnøvn, sum valevni hevur rætt til at nýta eftir lóggávuni, ella millumnøvn, sum eru fráboðað fólkayvirlitinum, kunnu setast á atkvøðuseðilin.
Ístaðin fyri fornavn, kann nýtast kallinavn, sum er eitt avbrigdi av fornavni.“

**21)** Í § 17, stk. 4 verður „3“ broytt til: „2“.

**22) §** 17, stk. 5, 1. pkt. verður orðað soleiðis: „Listin skal vera undirskrivaður av valevnunum, góðkendur av einum flokki, sum er fráboðaður sbrt. § 16, stk. 2, ella undirskrivaður av í minsta lagi 400 og í mesta lagi 450 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, føðingardegi, bústaði, dagfesting og undirskrift.“

**23)** § 17, stk. 5, 4. pkt. verður orðað soleiðis:
„Listin skal vera latin inn av einum umboði fyri flokkin ella stillara, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum fyri, at listin er móttikin og nær.“

**24)** Í § 17, stk. 8 verður aftaná „send“ sett: „tí umboði fyri flokkin ella“.

**25)** Í § 17, stk. 9 verður aftaná „viðkomandi“ sett: „umboði fyri flokkin ella viðkomandi“.

**26)** Í § 18, stk. 1 verður: „ella biðja fleiri listar um at fáa somu bókstavamerking“ strikað.

**27)** § 18, stk. 2 verður orðað soleiðis:
*„Stk. 2.* Valevnislistar, sum ikki eru góðkendir av flokki, verða at rokna sum uttanflokkalistar.“

**28)** § 19, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
„Atkvøðuseðlarnir skulu verða soleiðis gjørdir, at teir kunnu faldast soleiðis, at óviðkomandi ikki sær, hvussu atkvøtt er.“

**29)** Í § 20, stk. 1, 1. pkt. verður „bygdarráðnum/ býráðnum“ broytt til: „kommunustýrinum“.

**30)** Í § 20, stk. 3 verður „Bygdarráðið“ broytt til: „Kommunustýrið“.

**31)** Í § 20, stk. 4, 2. pkt. verður „prentað“ strikað.

**32)** Í § 21 verður sum 3. pkt. sett: „Onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar.“

**33)** Yvirskriftin til kapittul IX verður orðað soleiðis: „**IX. Atkvøðugreiðsla á valdegnum**“

**34)** § 24, stk. 1 verður orðað soleiðis:
„Veljararnir koma fram at valborðinum soleiðis, sum teir vilja sjálvir, og sum høvi gevst at atkvøða. Veljarin skal hava valkortið við sær. Hevur veljarin ikki valkortið við sær, verður nýtt kort at skriva. Eftir at valstýrið (valstýrararnir ella hjálparfólkið) hevur vissað sær, at veljarin er tann, sum hann sigur seg at vera, og um hann stendur á vallistanum, verður hann avmerktur á vallistanum. Samstundis sum veljarin verður avmerktur á vallistanum, skal hann lata inn valkortið, sum síðani verður lagt saman við teim kortum, sum latin eru inn, í somu raðfylgju, sum veljararnir verða avgreiddir. Síðan verður atkvøðuseðilin útflýggjaður.“

**35)** § 24, stk. 2 verður orðað soleiðis:
*„Stk. 2.* Er veljari, sum møtir á valstaðnum, longu avmerktur á vallista, tí hann hevur brævatkvøtt smbr. § 42, stk. 1, verður brævatkvøða hansara tikin frá teimum brævatkvøðum, sum verða at rokna uppí smbr. § 42, stk. 3, og løgd til brævatkvøður, sum ikki verða at rokna uppí smbr. § 42, stk. 2.“

**36)** Í § 28, stk. 2, 4. pkt. verður aftaná „einum“ orðið „av“ strikað.

**37)** § 29, stk. 2 verður orðað soleiðis:
*„Stk. 2.* Úrslitið verður ført í valbókina, og verður fráboðan skjótast gjørligt send landsstýrismanninum á tann hátt, sum fráboðað er undan valinum. Úrslitið skal eisini kunngerast fyri teim hjástøddu.“

**38)** Í § 31, stk. 4 verður aftaná „landsstýrinum“ sett: „atkvøðutilfarið og“.

**39)** Í § 31, stk. 5 verður „valnevndarformanninum“ broytt til: „landsstýrismanninum“.

**40)** § 32 verður orðað soleiðis:
„**§ 32.** Flokkur, sum fær minni enn 4% av samlaða atkvøðutalinum, fær einki umboð.“

**41)** § 35 verður orðað soleiðis:
„**§ 35.** Veljarar, ið ynskja at velja, men sum valdagin ikki kunnu møta persónliga á valstaðnum at greiða atkvøðu, herundir sjófólk, sjúk og onnur, ið ikki hava møguleika at greiða atkvøðu á valstaðnum valdagin, kunnu greiða atkvøðu við innsending av brævatkvøðu eftir reglunum í §§ 36-43.“

**42)** Í § 36, stk. 1 verður sum 3. pkt. sett: „Veljarar, sum ynskja at greiða brævatkvøðu eftir kapittul XII, skulu, um hetta verður mett neyðugt, vísa nøktandi samleikaprógv.“

**43)** Í § 36, stk. 2 verður aftaná „persónum“ sett: „„sum báðir skulu hava við sær samleikaprógv umframt útnevningina.“

**44)** Í § 42, stk. 1 verður sum 2. pkt. sett: „Eru fleiri brævbjálvar frá sama veljara, verður bert brævbjálvin við seinast dagfesta fylgibrævi roknaður uppí.“

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn,11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Annika Olsen (sign.)

Lm. nr. 139/2008

Nr. 48 11. mai 2009

# Løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Studningslán úr landskassanum, sum er rentu og avdráttarfrítt, kann latast kommunum til keyp, nýbygging ella umbygging av ognum, sum skulu nýtast til ellis- og røktarheim ella til eldrasambýli.
*Stk. 2.* Studningslán kann eisini veitast sjálvsognarstovnum, ið eiga ellis- og røktarheim ella eldrasambýli.

**§ 2.** Umsóknir um studningslán verða viðgjørdar við grundarlagi í tørvinum á eldrabúplássum í upptøkuøkinum.

**§ 3.** Treytin fyri, at studningslán verður veitt, er:
1) at keypi- ella byggiætlanin er góðkend av landsstýrismanninum, áðrenn farið verður undir hana,
2) at studningslánið er tryggjað við veðrætti innan fyri 90% av metingarvirðinum, og
3) at viðtøkur eru fyri heimið, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og sum einans kunnu broytast við samtykki hansara.

**§ 4**. Til ellis- og røktarheim verður veitt í mesta lagi 700.000 kr. fyri hvørt búfólkið, sum heimið er ætlað til, tó ongantíð meira enn helvtina av keypi- ella byggikostnaðinum.
*Stk. 2.* Til eldrasambýli verður veitt í mesta lagi 80.000 kr. fyri hvørt búfólkið, sum sambýlið er ætlað til, tó ongantíð meira enn helvtin av keypi- ella byggikostnaðinum.

**§ 5.** Í tíðarskeiðinum 2009 til 2011 verða í mesta lagi latnar 95 milliónir kr. í studningsláni úr landskassanum samanlagt og í mesta lagi 45 mió. kr. í einum ári. Innan fyri hesar karmar verður landsstýrismanninum heimilað í 2009 at geva tilsagnir um játtan í ávikavist 2010 og 2011. Í 2009 er útgjald av studningsláni bundið av játtanini á fíggjarlógini.

**§ 6.** Studningslánið fellur til gjaldingar, um ognin verður seld, ella ikki longur verður nýtt til ellis- og røktarheim ella sambýli.
*Stk. 2.* Hesar treytir skulu tinglýsast á ognini við servitutti.

**§ 7**. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst, og fer úr gildi 31. desember 2011.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Rósa Samuelsen (sign.)

Lm. nr. 144/2008

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtingslóg um ferðslu, sbr. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** § 2, III, B verður orðað soleiðis:

**„B. Traktor**: Motordrivið akfar, sum í høvuðsheitum er útgjørt at draga annað akfar ella arbeiðsamboð, og sum er gjørt at ganga í mesta lagi 40 km/t.“

**2)** § 2, IV verður orðað soleiðis:

„IV
**Viðfestiakfar:** Akfar, ið er tilgjørt til at verða drigið av øðrum akfari. Viðfestiakfør verða býtt í viðfestivogn, leguvogn og viðfest amboð.

**Viðfestivognur:** Akfar, sum drigið verður av motordrivnum akfari og er ætlað til fólka- ella vøruflutning, leguvognur tó undantikin.

**Leguvognur:** Akfar, sum verður koplað upp í motordrivið akfar, so at akfarið ella tess last liggur inn á tað akfarið, sum dregur, og sum er ætlað til fólka- ella vøruflutning.

**Viðfest amboð:** Annað akfar, sum verður koplað upp í annað motordrivið akfar. Húsvognur er mettur sum viðfest amboð.

**Síðuvognur:** Akfar við eittans hjóli, sum verður koplað upp í síðuna á motorsúkklu á 2 hjólum, og er ætlað til fólka- ella vøruflutning.“

**3)** Yvirskriftin yvir § 15 „*Sjúka, overving v.m.*“ verður broytt til „*Tilvitsávirkandi evni, sjúka, overving v.m.*“

**4)** § 15 verður orðað soleiðis:
„**§ 15**. Ongin, hvørs blóð, meðan ella aftaná koyrt verður, hevur í sær evni, ið ávirka tilvitið, sum sambært reglum, ásettum av landsstýrismanninum, eru flokkað sum vandamikil fyri ferðslutrygdina, má føra ella royna at føra motordrivið akfar Henda áseting verður tó ikki at nýta á evni, sum viðkomandi hevur tikið sambært og í samsvari við eina lógliga ávísing.
*Stk. 2.* Heldur ongin, sum orsakað av sjúku, veikleika, overving, ovvekri ella undir árini av huglættandi ella doyvandi evnum ella av tílíkum grundum er soleiðis háttaður, at hann ikki er førur fyri at føra akfarið á tryggan hátt, má føra ella royna at føra eitt motordrivið akfar.“

**5)** Aftaná § 15 verður sum yvirskrift sett: „*Rúsdrekkakoyring v.m.*“

**6)** Í § 16, stk. 1, 1. pkt. verður „0,80o/oo“ broytt til: „0,20 promillu, ella um alkoholstyrkin í útandingarluftini, meðan hann koyrir ella aftaná, fer upp um 0,10 mg pr. litur luft.“

**7)** Í § 16, stk. 1, 2. pkt. verður „0,80o/oo“ broytt til: „0,20 promillu, ella um alkoholstyrkin í útandingarluftini í nevnda tíðarbili ella aftaná fer upp um 0,10 mg pr. litur luft.“

**8)** § 16, stk. 3 verður strikað, og stk. 4-6 verða hereftir stk. 3-5.

**9)** Í § 16, stk. 3 verður „1.-3. stk.“ broytt til: „stk. 1 og 2“.

**10)** Í § 16, stk. 4 og stk. 5 verður aftaná orðið „rúsdrekka“ sett: „ella av teimum í § 15, stk. 2 nevndu grundum“

**11)** Í § 16 a, stk. 1 verður „útandingarroynd“ broytt til: „útandingar-, sveitta- ella spýttroynd ella letur eyguni kannað. Løgreglan kann krevja, at ein persónur ger útandingarroynd á øðrum staði, enn komið er fram á hann, um orsøk er til at halda, at hann hevur framt brot á § 16.“

**12)** Í § 16 a, stk. 2 verður „§ 16, 1.-5. stk.“ broytt til: „§ 16, stk. 1-4“

**13)** Í § 18, stk. 4, nr. 4 verður orðið „viðfestivogn“ broytt til: „viðfestiakfar“.

**14)** § 18 c, stk. 3, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
„Er persónur frádømdur koyrirættin treytaleyst orsakað av rúsdrekkakoyring, kann hann, tá ið frádømutíðin er umliðin, einans afturvinna koyrirættin aftaná at hava luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði), og tá ein eftiransandi koyriroynd er staðin.“

**15)** Í § 18 c, stk. 3 verður sum nýtt 6. pkt. sett: „Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið í R/F-skeiði.“.

**16)** § 18 c, stk. 4 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 4.* Er persónur frádømdur koyrirættin treytað, skal hann innan eina freist, sum verður ásett av Akstovuni, til eina eftiransandi koyriroynd. Er koyrirætturin frádømdur treytað vegna rúsdrekkakoyring,

skal viðkomandi áðrenn eftiransandi koyriroyndina hava luttikið í skeiði í rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði). Koyrirætturin verður tikin, um viðkomandi ikki stendur royndina ella letur vera við at fara til hana. Eftiransandi roynd verður ikki kravd, um so er, at hin dømdi hevur staðið eina koyriroynd, ið inniheldur ferðsluástøði, aftaná tilburðin, sum var orsøk til frádømingina. Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið í R/F-skeiði.".

**17)** § 18 c, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um innihaldið í koyrifrálæruni og um fremjingina av R/F-skeiðunum í sambandi við endurvinning av koyrirættinum aftaná eina treytaleysa ella treytaða frádøming, og um eftiransandi koyriroynd, herundir um afturtøku av koyrirættinum sbrt. stk. 4."

**18)** Í § 18 d, verður aftaná stk. 1, sum nýtt stk. sett:
„*Stk. 2.* Er koyriforboð givið eftir § 59 h fyri tilburðir, sum eru umfataðir av § 59 a, stk. 1, nr. 2, kann førarin einans fáa koyrirættin aftur, um hesin frammanundan hevur luttikið í einum R/F-skeiði og hevur staðið eina eftiransandi koyriroynd."
Stk. 2-4 verða hereftir stk. 3-5.

**19)** Í § 18 d, stk. 4 verður „Serlig koyrifrálæra skal verða gjøgnumførd" broytt til: „Serlig koyrifrálæra ella R/F-skeið skal verða gjøgnumført".

**20)** Í § 24, stk. 2 verður „politimaður báknar" broytt til: „løgreglan gevur tekn".

**21)** Í § 24 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stk. sett:
„*Stk. 3.* Ávísingar sambært stk. 1 og 2 ganga fram um ferðslureglurnar."
Stk. 3 verður hereftir stk. 4.

**22)** § 33 a, stk. 1, nr. 6 verður orðað soleiðis:
„6) á strekki, har akbreytin framman fyri vegamót við hindrunarstriku er løgd sundur í farbreytir ella 5 m áðrenn, eitt slíkt strekki byrjar,"

**23)** Í § 36 verður aftaná stk. 2 sum nýtt stk. sett:
„*Stk. 3.* Tað er bannað at hava ferðafólk í last- ella vørurúmi í akfari. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um undantak frá 1. pkt."
Stk. 3-5 verða hereftir stk. 4-6.

**24)** Yvirskriftin yvir § 42, § 42 og § 42 a verða strikað, og í staðin verður sett:

*„Trygdarbelti*

**§ 42.** Um sæti í einum bili ella á tríhjólaðari motorsúkklu hevur trygdarbelti, skal hetta undir koyring nýtast av tí persóni, sum í sætinum situr, sbr. tó stk. 2 og 3 og § 42 b. Saman við trygdarbelti kann selakoddi verða nýttur.
*Stk. 2.* Skyldan at nýta trygdarbelti er ikki galdandi undir bakking ella undir koyring á parkeringsplássi, bensinstøð, verkstaðarøki ella undir líknandi viðurskiftum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at ávísir persónar sleppa undan skylduni at nýta trygdarbelti, sbr. stk. 1, heruppií í sambandi við serstøk sløg av koyring.
*Stk. 4.* Bilførarin skal ansa eftir, at ferðandi, sum ikki eru fylt 15 ár, nýta trygdarbelti í samsvari við stk. 1 og reglum, ásettar sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at førarin av einum bussi heilt ella lutvíst sleppur undan skylduni sambært stk. 4, og um hvørji tiltøk førarin í staðin skal gera.

*Trygdarútgerð til børn*

**§ 42 a.** Tá koyrt verður í øðrum bilum enn bussum ella á tríhjólaðari motorsúkklu, ið hava sæti til ferðandi við trygdarbelti, skulu børn, ið eru minni enn 135 cm, undir koyring nýta góðkenda trygdarútgerð, sum er tillagað hædd og vekt barnsins, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 2.* Í øðrum bilum enn bussum, ið ikki hava sæti við trygdarbelti til ferðandi, har góðkend trygdarútgerð, tillagað hædd og vekt barnsins, kann verða sett í, kunnu børn undir 3 ár ikki verða flutt, meðan børn, sum eru 3 ár og eldri og undir 135 cm, einans kunnu verða flutt á einum øðrum sæti enn forsetrinum, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 3.* Børn kunnu ikki verða flutt í bili í barnastóli, ið vendur aftureftir, á einum sæti, sum hevur stoytkodda frammanfyri, um ikki stoytkoddin er gjørdur óvirkin.
*Stk. 4.* Tá koyrt verður í bussi, skulu børn, sum eru 3 ár og eldri, og sum eru undir 135 cm, nýta trygdarbelti ella aðra góðkenda trygdarútgerð, í tann mun sætið hevur hetta, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um nýtsluna av trygdarútgerð, tá børn undir 135 cm verða flutt, heruppií um, at stk. 1, 2 og 4 heilt ella lutvíst ikki skulu nýtast.
*Stk. 6.* Bilførarin skal ansa eftir, at reglurnar í stk. 1-4 og reglur, ásettar sambært stk. 5, verða hildnar.
*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at bussførari heilt ella lutvíst kann sleppa undan teirri í stk. 6 nevndu skyldu, og um hvørji tiltøk førarin í staðin skal gera.
*Stk.8.* Til tess at hava eftirlit við, at reglurnar í stk. 1, 2 og 4 og reglur, ásettar við heimild í stk. 5, sbr. stk. 6, verða hildnar, kann løgreglan til eina og hvørja tíð krevja, at eitt barn, ið verður flutt í bili ella á tríhjólaðari motorsúkklu, verður mátað og vigað. Løgreglan mátar og vigar barnið."

*Talið á ferðandi, ið lógliga kunnu verða flutt*

**§ 42 b.** Talið á ferðandi á forsetrinum í einum bili, má ikki fara upp um talið á sitiplássum til ferðandi, sum hava trygdarbelti. Ásetingin í 1. pkt. verður at nýta samsvarandi viðvíkjandi flutningi av ferðandi á baksetrinum ella baksetrunum í einum bili.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1, 1. pkt. verður ikki at nýta á flutning í bilum, har sitiplássini til ferðandi á forsetr-

inum ikki hava trygdarbelti. Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. verður ikki at nýta á flutning av ferðandi í bilum, har sitiplássini á baksetrinum ella baksetrunum ikki hava trygdarbelti.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at stk. 1 ikki skal verða nýtt í serligum førum, heruppií tá flutt verða ferðandi, sum sambært reglum, ásettar sambært § 42, stk. 3 og § 42 a, stk. 5, sleppa undan at nýta trygdarútgerð, og tá tað snýr seg um serstøk sløg av koyring.
*Stk. 4.* Tann ferðandi hevur skyldu til at ansa eftir, at ásetingin í stk. 1 og reglur, ásettar sambært stk. 3, verða hildnar. Fyri ferðandi, ið ikki eru fylt 15 ár, skal førarin tó síggja til, at reglan í stk. 1 og reglur, ásettar sambært stk. 3, verða hildnar.

*Fallhjálmar*

**§ 42 c.** Førari av tvíhjólaðari motorsúkklu, ella av motorsúkklu við síðuvogni, og av prutli, og øll ferðandi, sum fylt eru 15 ár, skulu, meðan koyrt verður, nýta fastspentan fallhjálm við hjálmglugga. Um fallhjálmur ikki hevur hjálmglugga, skulu verndarbrillur nýtast.
*Stk. 2.* Førarin skal síggja til, at hvør, sum við er, ið hevur fylt 8 ár, men enn ikki 15 ár, er í fastspentum fallhjálmi við hjálmglugga. Um fallhjálmur ikki hevur hjálmglugga skulu verndarbrillur nýtast.
*Stk. 3.* Skyldan til at nýta fallhjálm er ikki galdandi, meðan koyrt verður á bilaplássi, tænastustøð, verkstaðarrúmi ella í líkum umstøðum.
*Stk. 4.* Landsstýrið kann áseta reglur um undantøkur frá skylduni at nýta fallhjálm."

**25)** Í § 43 verður sum stk. 5 sett:
„*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um trygdarbúna og aðra útgerð hjá førara og ferðandi á motorsúkklu og í síðuvogni hennara."

**26)** § 44, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* § 45, stk. 2 og 3 um pláss á vegnum og koyring um krossveg er eisini galdandi fyri prutl, tó soleiðis, at um prutl skal sneiða til vinstru á krossvegi við meira enn einari farbreyt, har tann eina er til sneiðing til vinstru, kann prutlið stilla seg mitt í hesi farbreyt. Prutlið skal tá sneiða soleiðis, at tá tað fer av krossvegnum, skal tað vera statt høgrumegin á teirri akbreyt, ið tað sneiðir inn á. § 29 b, stk. 2 er galdandi, tá sneitt verður til vinstru."

**27)** § 58, verður orðað soleiðis:

**„§ 58.** Rúsdrekkakoyring við motorakfari, traktori ella motoramboði og brot á § 15, stk. 1 ella 2 verður revsað við sekt, sbr. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Revsingin eftir stk. 1 kann hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um
1) alkoholstyrkin, meðan koyrt verður ella aftaná, hevur verið oman fyri 2,00 promillu í blóðinum ella oman fyri 1,00 mg pr. litur luft í útandingarluftini. Sama er galdandi í ella aftaná tíðarbilið, sum nevnt er í § 16, stk. 1, 2. pkt., um alkoholstyrkin í blóðinum er farin upp um 2,00 promillu ella er farin upp um 1,00 mg pr. litur luft í útandingarluftini,
2) førarin undir serliga herðandi umstøðum hevur brotið § 15, stk. 2,
3) førarin verður funnin sekur í fleiri tilburðum av rúsdrekkakoyring ella broti á § 15, stk. 1 ella 2,
4) førarin áður er dømdur at missa koyrirættin treytað vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, og nýggi tilburðurin er framdur innan 3 ár eftir, at fyrra avgerðin varð endalig,
5) førarin áður hevur fingið koyriforboð sambært § 59 h vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, og nýggja brotið er framt innan 3 ár eftir, at avgerðin um koyriforboðið varð endalig,
6) førarin áður er dømdur at missa koyrirættin treytaleyst vegna rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk. 1 ella 2, og nýggja brotið er framt innan 5 ár eftir, at frátøkutíðin er úti,
7) rúsdrekkakoyring ella brot á § 15, stk.1 ella 2 er farið fram við óheimilaðari nýtslu av einum motorakfari, einum traktori ella einum motoramboði, sbr. § 293, stk. 1 í revsilógini, ella
8) førarin verður funnin sekur í tilburði, ið er fevndur av § 59 a, stk. 1, nr. 1, 3, 4 ella nr. 5.

*Stk. 3.* Rúsdrekkakoyring við prutli verður revsað við sekt. Er hin seki áður dømdur fyri rúsdrekkakoyring, kann revsingin hækka til hefti ella fongsul í upp til 1 ár.
*Stk. 4.* Brot á § 18, stk. 1, § 18 a, stk. 1 og stk. 4 og § 26, stk. 1 verður revsað við sekt, ella, um umstøðurnar eru herðandi, við hefti ella fongsli í upp til 1 ár.
*Stk. 5.* Tann, sum koyrir motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, hóast viðkomandi treytaleyst er frádømdur rættin til at vera ella gerast førari á tílíkum akfari, verður revsaður við sekt. Revsingin kann hækka til hefti ella fongsul í 1 ár og 6 mánaðir, um førarin
1) verður funnin sekur í koyring í fleiri førum í frádømingartíðini, ella
2) áður er revsaður fyri koyring í frádømingartíðini.

*Stk. 6***.** Sektir sambært stk. 1, verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, tá brotið varð framt. Tá støddin á sektini fyri rúsdrekkakoyring verður ásett, skal fyrilit eisini verða tikið fyri alkoholstyrkini í blóðinum ella í útandingarluftini, meðan koyrt verður ella aftaná.
*Stk. 7.* Sektir sambært stk. 5 verða ásettar við atliti at inntøkuviðurskiftunum hjá viðkomandi, tá brotið varð framt. Sama er galdandi fyri sektir, ið sambært § 58 í revsilógini verða givnar í sambandi við treytaða fongsulsrevsing, ásett sambært stk. 2 ella stk. 5.

*Stk. 8.* Frávik kann verða gjørt frá ásetingunum í stk. 6 og 7, um serligar grundir tala fyri tí.

**28)** Í § 58 a, stk. 1, nr. 1 verður „§ 36, stk. 1-3" broytt

til „§ 36, stk. 1-4". Harumframt verður „§ 42, stk. 1 og stk. 6, § 42 a, stk. 1-2" broytt til: „§ 42, stk. 1 og 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, § 42 c, stk. 1-2"

**29)** Í § 58 a, verður aftaná stk. 8 sett:
„*Stk. 9.* Sektir fyri brot á hesa lóg og fyri brot á reglur, givnar sambært lógini, verða ásettar til upphæddir, sum kunnu býtast við 500 kr., sbr. tó stk. 2.
*Stk. 10.* Sektir til persónar við serliga lágari inntøku kunnu ásetast til upphæddir, ið ikki kunnu býtast við 500 kr. Slíkar sektir kunnu tó ikki ásetast til upphædd undir 300 kr.
*Stk. 11.* Hevur nakar við einari ella fleiri gerðum brotið hesa lóg ella reglur, givnar við heimild í hesi lóg, og brotini verða revsað við sekt, verða sektirnar fyri hvørt brotið lagdar saman. Hevur nakar við einari ella fleiri gerðum brotið hesa lóg ella reglur, givnar við heimild í hesi lóg, og eina ella fleiri aðrar lógir, og brotini verða revsað við sekt, verða sektirnar fyri hvørt brotið á hesa lóg ella reglur, givnar við heimild í hesi lóg, lagdar saman við sektunum fyri brot á hina ella hinar lógirnar.
*Stk. 12.* Hevur nakar við einari ella fleiri gerðum brotið hesa lóg ella reglur, givnar sambært lógini, og eitt av brotunum verður revsað við hefti ella fongsli, meðan eitt annað brot verður revsað við sekt, dømir rætturin eina sekt umframt hefti ella fongsulsrevsing. Sama er galdandi, um nakar við einari ella fleiri gerðum hevur brotið hesa lóg ella reglur, givnar við heimild í hesi lóg, og eina ella fleiri aðrar lógir, og brotið á hesa lóg ella reglur, givnar sambært hesi lóg, verður revsað við sekt, og brotið á hina ella hinar lógirnar verður revsað við hefti ella fongsulsrevsing.
*Stk. 13.* Vikið kann verða frá reglunum í stk. 11 og 12, tá serligar grundir tala fyri tí."

**30)** Í § 58 g, stk. 1 verður „rúsdrekka- ella promillukoyring" broytt til: „rúsdrekkakoyring"

**31)** Í yvirskriftini yvir § 59 verður „*Rúsdrekka- og promillukoyring*" broytt til: „*Rúsdrekkakoyring*".

**32)** § 59 verður orðað soleiðis:
**„§ 59**. Rætturin til at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, tó ikki prutl, skal frádømast førara av slíkum akfari treytaleyst, um hann hevur gjørt seg sekan í rúsdrekkakoyring, og alkoholstyrkin í blóðinum er hægri enn 0,50 promillu, ella alkoholstyrkin í útandingarluftini er hægri enn 0,25 mg pr. litur luft."

**33)** Í § 59 a, stk. 1 verður nr. 2 orðað soleiðis:
„2) hann hevur gjørt seg sekan í rúsdrekkakoyring, og alkoholstyrkin í blóðinum er 0,50 promillu ella lægri, ella alkoholstyrkin í útandingarluftini ikki er hægri enn 0,25 mg pr. litur luft."

**34)** Í § 59 a, stk. 1 verður aftaná nr. 5, sum nýtt nr. sett:
„6) hann hevur framt brot á § 15, stk. 1, ella framt brot á § 15, stk. 2, sum ikki er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5.
Nr. 6 verður hereftir nr. 7.

**35)** Í § 59 a, stk. 2, verður aftaná nr. 4, sum nýtt nummar sett:
„5) undir herðandi umstøðum hevur framt brot á § 15, stk. 2,"

Nr. 5-7 verða hereftir nr. 6-8.

**36)** Í § 59 a, stk. 4, nr. 1 verður „§ 42, stk. 6, § 42 a, stk. 2" broytt til: „§ 42, stk. 4, § 42 a, stk. 6, § 42 b, stk. 4, 2. pkt., § 42 c, stk. 2"

**37)** § 59 a, stk. 4, nr. 2 verður orðað soleiðis:
„2) § 24, stk. 1 og 2, um brotið umfatar, at koyrt er fram, hóast ljóssignalið er reytt, at koyrt er móti ferðsluleiðini, ella at farið er yvir um hindrunarstrikur,".

**38)** § 59 b, verður orðað soleiðis:
**„§ 59b.** Treytaleys frádøming verður gjørd fyri eitt tíðarskeið upp á millum 6 mánaðir og 10 ár, sbr. tó stk. 2 og 3.
*Stk. 2.* Treytaleys frádøming fyri rúsdrekkakoyring við eini alkoholstyrki upp á oman fyri 1,20 promillu í blóðinum, ella 0,60 mg pr. litur luft í útandingarluft, ella fyri brot á § 15, stk. 2, ið er fevnt av § 59 a, stk. 2, nr. 5 og er dømt at geva treytaleysa frádøming, verður gjørd fyri eitt tíðarskeið, sum í minsta lagi er 3 ár.
*Stk. 3.* Frádømingin kann verða gjørd fyri alla tíð, um førarin undir koyringini hevur framt grovt koyrimistak, koyringin hevur elvt til álvarsaman persónsskaða, og slíkar upplýsingar eru um brot, sum førarin áður hevur framt á ferðslulógina, at ein frádøming av førararættinum fyri alla tíð, verður mett neyðug við fyriliti fyri ferðslutrygdini og rættarverjuni."

**39)** § 59 f, stk. 2 verður strikað.
Stk. 3 verður hereftir stk. 2.

**40)** Í § 59 f, stk. 2 verður „og 2" strikað.

**41)** Í § 59 h verður aftaná „er gjøgnumførd" sett: „ella luttikið er í R/F-skeiði, sbr. § 18 d, stk. 1 og 2,"
§ 2
Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. oktober 2009.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 kann til 1. januar 2012 verða flutt eitt størri tal av ferðandi á baksetrinum ella baksetrunum í persónbilum, enn tað er tal á sitiplássum, ið hava trygdarbelti.
*Stk. 3.* Persónar, sum innan 1. oktober 2009 fyri alla tíð, sbr. § 59 b í ferðslulógini, eru frádømdir rættin at koyra motordrivið akfar, sum koyrikort krevst til, kunnu fáa koyrirættin aftur, tá 10 ár eru fráliðin frá

seinasta dóminum, við hvørjum viðkomandi varð frádømdur koyrirættin fyri alla tíð, um ikki viðurskifti, sum eru nevnd í § 59 b, stk. 3, sum tey eru orðað í § 1, nr. 38 í hesum lógaruppskoti, tala ímóti endurvinning av koyrirættinum.

*Stk. 4.* Hóast ásetingina í stk. 1, kann inntil 1. oktober 2010 verða søkt um at fáa koyrirættindini aftur eftir reglunum í § 59b, stk. 2, um viðkomandi í minst 1 ár hevur yvirhildið eftiransandi viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Annika Olsen (sign.)

Lm. nr. 127/2008

Nr. 50 11. mai 2009

**Løgtingslóg**
**um**
**Búskaparráð**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismaðurin skipar búskaparráð, hvørs uppgáva er at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina.

**§ 2.** Ráðið hevur 3 limir, sum landsstýrismaðurin setir eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya.
*Stk. 2.* Limirnir skulu vera búskaparfrøðingar við kandidatútbúgving frá hægri lærustovni.
*Stk. 3.* Limirnir í ráðnum kunnu ikki starvast í fyrisitingini hjá landsstýrisfólkunum.
*Stk. 4*. Ráðið skipar seg við formanni.
*Stk. 5.* Valskeiðið hjá Búskaparráðnum er 4 ár frá 1. januar 2009 at rokna.
*Stk. 6.* Fer limur úr ráðnum, áðrenn valskeiðið er úti, velur landsstýrismaðurin nýggjan lim, eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya, fyri restina av valskeiðnum.
*Stk. 7.* Samsýningin til ráðslimirnar skal góðkennast av landsstýrismanninum.

**§ 3.** Búskaparráðið ger árliga tvær konjunkturfrágreiðingar, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september.
*Stk. 2.* Búskaparráðið kann harumframt gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

**§ 4.** Landsstýrismaðurin ger avtalu við óheftan stovn, at taka sær av skrivarauppgávunum og dagligu umsitingini hjá Búskaparráðnum.
*Stk. 2.* Avtalan kann sigast upp til hvønn 1. januar við 3 mánaða uppsagnarfreist.

**§ 5.** Henda lóg fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 120 frá 12. juli 1995 um búskaparráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 20. mai 1996.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Jóannes Eidesgaard (sign.)

Lm. nr. 132/2008

Nr. 51 11. mai 2009

**Løgtingslóg**
**um**
**vegføring oman fyri Skálafjørð**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri, at vegur við tilhoyrandi íbinding, íbindingarvegum, rundkoyring og bussstegðiplássi verður gjørdur frá landsvegnum Millum Fjarða, umleið 0,3 km innan fyri verandi frákoyring, umleið 2,4 km til grótbrotið í Skálafirði.

*Stk. 2.* Byggiútreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi verða 43,5 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Annika Olsen (sign.)

Lm. nr. 109/2008

Nr. 52 11. mai 2009

# Løgtingslóg
# um
# at broyta ymsar vinnufelagalógir (fylgibroytingar til grannskoðaralógina)

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

## § 1

Í fyriskipan nr. 1356 frá 9. desember 2007 „om ikrafttræden for Færøerne af lov om aktieselskaber", sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 84 verður áðrenn stk. 1 sum nýtt stk. 1 sett:
„Ein grannskoðari kann verða settur frá av tí, sum hevur valt grannskoðaran. Ein grannskoðari, ið er valdur sambært § 82, stk. 1, kann einans verða settur frá, innan starvstíðin er úti, um grundgivin viðurskifti geva orsøk til tað."
Stk. 1 og 2 verða hereftir stk. 2 og 3.

**2)** Í § 84, stk. 1, ið verður stk. 2, verður aftaná 1. pkt. sett inn:
„Við fráboðanini skal vera ein nøktandi frágreiðing um orsøkina til, at starvið er endað, um fráfaringin ella uppathaldið er farið fram, innan starvstíðin er úti."

**3)** Í § 84, stk. 2, ið verður stk. 3, verður „jf. stk. 1," broytt til: „sbr. stk. 2,"

**4)** Í § 156, stk. 2 verður sum 3. pkt. sett inn:
„Um grannskoðaraskifti fer fram, innan starvstíðin er úti, skal við fráboðanini vera ein nøktandi frágreiðing frá nevndini um orsøkina til, at starvið er endað."

## § 2

Í fyriskipan nr. 1111 frá 20. september 2007 „om ikrafttræden for Færøerne af lov om anpartsselskaber", sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í 23, stk. 3, verður sum 2. pkt. sett inn:
„Við fráboðanini skal vera ein nøktandi frágreiðing um orsøkina til, at starvið er endað, um fráfaringin ella uppathaldið er farið fram, innan starvstíðin er úti."

**2)** Í § 28 c verður sum stk. 2 sett inn:
„*Stk. 2.* Ein grannskoðari kann verða settur frá av tí, sum hevur valt grannskoðaran. Ein grannskoðari kann einans verða settur frá, innan starvstíðin er úti, um grundgivin viðurskifti geva orsøk til tað."

**3)** Í § 71, stk. 2, verður sum 3. pkt. sett inn:
„Um grannskoðaraskifti fer fram, innan starvstíðin er úti, skal við fráboðanini vera ein nøktandi frágreiðing frá ovastu leiðsluni um orsøkina til, at starvið er endað."

## § 3

Í fyriskipan nr. 1114 frá 20. september 2007 "om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder", sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 11, stk. 1 verður sum 3. pkt. sett inn:
„Um grannskoðaraskifti fer fram, innan starvstíðin er úti, skal við fráboðanini vera ein nøktandi frágreiðing frá leiðsluni um orsøkina til, at starvið er endað."

**2)** Í § 19 verður áðrenn stk. 1 sum nýtt stykki sett:
„Ein grannskoðari kann verða settur frá av tí, sum hevur valt grannskoðaran. Ein grannskoðari kann einans verða settur frá, innan starvstíðin er úti, um grundgivin viðurskifti geva orsøk til tað."
Stk. 1 verður hereftir stk. 2.

**3)** Í § 19, stk. 1, ið verður stk. 2, verður sum 2. pkt. sett inn:
„Við fráboðanini skal vera ein nøktandi frágreiðing um orsøkina til, at starvið er endað, um fráfaringin ella uppathaldið er farið fram, innan starvstíðin er úti."

## § 4

Í fyriskipan nr. 1113 frá 20. september 2007
"om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde", sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í §29, stk. 4 verður sum 2. pkt. sett inn:
„Við fráboðanini skal vera ein nøktandi frágreiðing um orsøkina til, at starvið er endað, um fráfaringin ella uppathaldið er farið fram, innan starvstíðin er úti."

**2)** Í § 32 verður sum 2. pkt. sett inn:
"Ein grannskoðari kann einans verða settur frá, innan starvstíðin er úti, um grundgivin viðurskifti geva orsøk til tað."

**3)** Í § 53, stk. 3 verður sum 2. pkt. sett inn:
„Um grannskoðaraskifti fer fram, innan starvstíðin er úti, skal við fráboðanini vera ein nøktandi frágreiðing frá ovastu nevndini um orsøkina til, at starvið er endað."

**§ 5**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Jóhan Dahl (sign.)

Lm. nr. 149/2008

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum fíggjarrættur (formueret))**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 7. juni 2008, verður § 1, stk. 2, nr. 2 strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 99/2008

Nr. 54 11. mai 2009

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum upphavsrættur)**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 7. juni 2008, verður § 1, stk. 2, nr. 21 strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2010.

Tórshavn, 11. mai 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 100/2008

FØROYAPRENT

Hefti 12 • Nr. 45-54 • Útgivið tann 22. mai 2009